BÚSKAPARRÁÐIÐ

**Várið**

# 2024

# Búskaparráðsfrágreiðing

Konjunkturmeting á vári 2024

Mars 2024

Economic report from the Economic Council of the Faroe Islands, Spring 2024.

# Búskaparráðið

Búskaparráðið hevur til uppgávu at fylgja við búskaparligum viðurskiftum í landinum og at koma við óheftari búskaparligari ráðgeving og frágreiðingum um búskaparligu gongdina. Skrivarauppgávan hjá Búskaparráðnum er við løgtingslóg nr. 72 frá 10. mai 2021 løgd til Landsbanka Føroya at røkja, og Búskaparráðið gevur við hesum út konjunkturfrágreiðingina, sum eftir lóg um Búskaparráð skal gerast tvær ferðir árliga; ávikavist tann 1. mars og 1. september.

Frágreiðingin liggur tøk at taka niður sum pdf-fílu á heimasíðuni hjá Landsbanka Føroya:

https://www.landsbankin.fo/fo-fo/buskaparraðið/fragreiðingar

Limir Búskaparráðsins eru:

Fróði Magnussen, cand.merc., formaður

Jan Otto S. Holm, cand.merc.fir.

Sanna Laksá, Ph.D. í búskaparfrøði

Helena Andreasen, cand.merc.aud.

Johnny í Grótinum, cand.polit.

Skrivarar Búskaparráðsins: Landsbanki Føroya, samstarv er við Hagstovu Føroya.

ISBN: 978-99918-3-817-5

# Innihaldsyvirlit


Samandráttur ... 4

Konjunkturmeting várið 2024 ... 6

1 Bruttotjóðarúrtøka ... 7

Meting av vøkstrinum í BTÚ ... 7

BTÚ býtt á vakstrarískoyti ... 8

BTÚ í føstum prísum ... 9

Altjóða útlit ... 12

2 Privat nýtsla og íløgur ... 13

Treystið hjá húsarhaldunum ... 13

Prísvøkstur ... 14

Nýtslan hjá húsarhaldunum ... 15

Sethúsamarknaðurin ... 18

Treystið í vinnuni ... 20

Trot á arbeiðsmegi og útlendsk arbeiðsmegi ... 21

3 Almenn nýtsla og íløgur ... 24

Úrslitið á almennu roknskapunum ... 24

Nýtslan hjá almennari fyrisiting og tænastu ... 26

Íløgur almenna geirans ... 26

4 Nettoútflutningur ... 28

Handilsjavni ... 28

Fiskavøruútflutningur ... 29

Laksur ... 30

Uppsjóvarfiskur ... 31

5 Fíggjarpolitiskt regluverk og langtíðarhaldføri ... 35

6 Inflasjón og prísvøkstur ... 42

Fylgiskjal 1 ... 44

Fylgiskjal 2 ... 45

Keldur ... 46

Tables and figures ... 47

Tíðindaskriv frá Búskaparráðnum 29. februar 2024 ... 49

English summary ... 51

# Samandráttur

## Konjunkturstøðan er ikki broytt

Búskaparráðið hevur endurskoðað vøksturin í BTÚ fyri árini 2023 – 2024 vegna dagførd hagtøl og mett um BTÚ fyri 2025. Hagstova Føroya hevur endaliga uppgjørt vøksturin í BTÚ í leypandi og føstum prísum fyri árini 1998 til 2022. Reali búskaparvøksturin var 5,8% í 2021 og 5,4% í 2022 og kom hann av, at føroyski búskapurin fótaði sær eftir koronufarsóttina; serliga var stór framgongd í tilfeingis- og privatu tænastuvinnuni. Metingin av vøkstrinum í BTÚ fyri 2023 - 2025 verður gjørd í leypandi prísum, og er mettur at gerast ávikavist 5,4% í 2023, 4,4% í 2024 og 2,8% í 2025.

| | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 | 2025 |
|---|---|---|---|---|---|
| BTÚ-vøkstur í leypandi prísum | 7,7% | 9,5% | *5,4%* | *4,4%* | *2,8%* |
| BTÚ-vøkstur í føstum prísum | 5,8% | 5,4% | | | |

**Viðm.:** 2021 og 2022 er uppgerð hjá Hagstovu Føroya. 2023, 2024 og 2025 eru metingar Búskaparráðsins.
**Kelda:** Hagstova Føroya og Búskaparráðið.

Lyklatølini vísa framvegis, at **føroyski búskapurin er stinnur**. Meðan útflutningurin hevur verið minni av summum fiskasløgum í 2023 (laksi og botnfiski), hevur økta kvotan av svartkjafti økt um útflutningin av millum annað fiskaúrdrátti. Samstundis sum útflutningsvirðið vaks í 2023, minkaði innflutningsvirðið, ið millum annað kom av lægri oljuprísi, og tí var **framvegis avlop á handilsjavnanum** í 2023.

Arbeiðsloysið er enn lágt í Føroyum (1% jan. 2024). **Sterki arbeiðsmarknaðurin** ger, at **húsarhaldini hava varðveitt bjartskygnið**, hóast rentuhækkingar og inflasjón hava minkað um keypiorkuna síðani á sumri í 2022. Mett verður, at útlit til lønarhækkingar og skattalætta saman við lægri inflasjón og væntanir um rentulækkingar, viðvirka til, at húsarhaldini kortini eru við gott mót.

**Prísirnir veksa** enn, men **ikki eins nógv**, sum teir hava tað seinasta árið. Í fjórða ársfjórðingi 2023 vaks brúkaraprístalið við 2,8%, og tað er munandi lægri, enn vøksturin í brúkaraprístalinum hevur verið síðani miðjan 2022. Meðan oljuprísirnir høvdu størstu ávirkanina á brúkaraprístalið í byrjanini av 2022, hevur tað síðani verið øktir matvøruprísir, ið hava togað brúkaraprístalið upp. Við endan av 2023 høvdu rentuútreiðslur hinvegin størstu ávirkanina á brúkaraprístalið. **Tað hava verið 10 rentuhækkingar** síðani á sumri 2022, og rentuútreiðslurnar hjá føroysku húsarhaldunum til bústaðarskuld eru øktar 82% í tíðarskeiðinum juli 2022 – desember 2023.

Peningastovnarnir meta, at **húsarhaldini** eru vorðin **eitt vet meira varin** síðani rentan og prísstøðið byrjaði at hækka. Líkt er tó til, at tey hava havt fíggjarligt rásarúm til at kunna lofta dýrkaða livikostnaðinum. Fyrstuferðskeyparar hava tó havt enn verri við at sleppa inn á sethúsamarknaðin í miðstaðarøkinum í 2023, enn frammanundan. Í Tórshavn hava sethúsaprísirnir hildið sær í 2023 í mun til í 2022, meðan hann í sama tíðarskeiði er minkaður í størri bygdunum og í Suðuroy og Sandoy. Í smærru bygdunum var miðalprísurin á sethúsum tó hægri í 2023, enn í 2022.

**Treystið hjá vinnuni** var **lægri** í januar 2024 enn í juni 2023. Tilfeingisvinnan boðar frá lægri eftirspurningi og størri goymslum av liðugtvørum, men vinnan væntar príshækkingar á sild, og á toski í Barentshavinum vegna fallandi kvotu. Harumframt væntast ein stígur í altjóða útboðnum av laksi, sum kann merkja øktur laksaprísur í 2024. Handilsvinnan letur ikki væl at, og boðar frá stórum goymslum og væntanum um lægri sølu í 2024. Húsarhaldini hava skift til bíligari vørur og eftirspurningurin eftir nýggjum bilum er lækkaður munandi. Privata tænastuvinnan metir, at umsetningurin í 2023 hevur verið ónøktandi, men hevur tó góðar vónir um eftirspurningin í 2024. Treystið í byggivinnuni er hinvegin framvegis gott og onnur hvør byggifyritøka boðar frá troti á arbeiðsmegi og í ferðavinnuni verður boðað frá øktum bíleggingum frá ferðafólki til summarið og heystið í 2024.

**Úrslitið á fíggjarlógini** metir Búskaparráðið **verður -146 mió. kr. í 2024** og **-31 mió. kr. í 2025**. Metingin tekur støði í fíggjarlógini fyri 2024, sum vísir eitt avlop á góðar 4 mió. kr. Búskaparráðið metir, at tað burturav støðlingum av íløgum á 200 mió. kr., sum eru fluttar frá 2023, vera nýttar 100 mió. kr. í 2024 og harafturat at MVG-inntøkurnar vera 50 mió. kr. minni enn mett. Fyri fíggjarárið 2025 hevur

Búskaparráðið tikið støði í framskrivingum hjá Fíggjarmálaráðnum. Hesar framskrivingar taka tó ikki hædd fyri prís- og lønarvøkstri, og tí hevur Búskaparráðið lagt tað afturat. Tað gevur eitt hall á 31 mió. kr. í 2025. Hallið er minni í 2025 enn í 2024, tí íløgurnar hjá landinum fella við nærum 200 mió. kr. Búskaparráðið metir tað vera illa frágingið, tá úrslitið á fíggjarlógini vísir eitt hall í bæði 2024 og 2025 eftir áhaldandi búskaparvøkstur í fleiri ár á rað við lágum arbeiðsloysi og stórum inntøkuvøkstri í landskassanum. Úrslitini staðfesta, **at politiska skipanin** framvegis **ikki megnar at halda aftur við útreiðsluvøkstri í góðum tíðum**. Harafturat standa upphæddir, ið skulu flytast í búskapargrunnin, sum inntøkur á fíggjarlógini. Hetta ger, at tað er sera ringt hjá politikarunum og borgarum at gjøgnumskoða, hvat veruliga úrslitið á fíggjarlógini er, og hvørjum úrsliti politiska skipanin kann raðfesta eftir.

## Set í verk eitt fíggjarpolitiskt regluverk

Ávísin fyri **fíggjarpolitiska haldførið er -9% av BTÚ**, vísir nýggja greiningin av haldførinum, hjá Búskaparráðnum. Av tí, at tað í framtíðini ikki verður sama lutfall millum tal av forsyrgjarum og tey, ið skulu forsyrgjast, sum í dag, verður fíggingartørvurin komandi 40 árini 45 mia. kr.

Í núverandi lóggávu er samtykt at hækka pensjónsaldurin við einum hálvum ári í 2025 og 2030, men tað røkkur ikki til at loysa haldførisavbjóðingina. Hækkar **pensjónsaldurin** ístaðin **við einum ári** fimta hvørt ár frá 2035, gerst fíggjarpolitikkurin við tíðini haldførur, og fíggingartørvurin minkar niður í 12 mia. kr. komandi 40 árini. Politiska skipanin noyðist tí at fremja nýskipanir og átøk, sum minka um útreiðslurnar og økja inntøkurnar, umframt at hækka pensjónsaldurin við einum ári fimta hvørt ár.

Eitt fíggjarpolitisk regluverk ger, at tað fæst **tamarhald á útreiðsluvøkstrinum**. Politiska skipanin eigur í eini **breiðari semju**, at seta sær **mál fyri úrslitið hjá almenna geiranum 10 ár fram í tíð**, ið er í samsvar við ein haldføran búskap í langa høpinum, tað vil siga hjá landi og kommunum undir einum. Tá tað er gjørt, verður mett um inntøkurnar í hesum tíðarskeiði og síðani verður roknað, hvørjar útreiðslur inntøkurnar røkka til, treytað av, at málið fyri úrslitið verður rokkið. Landið eigur í hesum sambandi at samráðast við kommunurnar um ein útreiðslukarm fyri til dømis eitt fýraára tíðarskeið, ið liggur fastur, men sum kommunurnar frítt kunnu raðfesta innanfyri.

## Veks um arbeiðsútboðið

At stytta arbeiðsvikuna minkar um arbeiðsútboðið, men verður hetta kortini framt, eigur politiska skipanin at **fremja átøk, ið økja um arbeiðsútboðið**. Trot á arbeiðsmegi er og verður frameftir ein stór avbjóðing fyri føroyska búskapin, bæði í almenna og privata geiranum. Fast-track skipanin hevur lætt um trýstið í ávísum pørtum av arbeiðsmarknaðinum. Eisini er tað er eitt stig á røttu leiðini, at politiska skipanin hevur minkað um frádráttirnir til fólk, sum arbeiða uttanlands. Búskaparráðið er tó av tí fatan, at allar **serskattaskipanir, sum eggja fólki at arbeiða uttanlands** heldur enn í Føroyum, **eiga at vera avtiknar**.

## Avtak almennar stuðulsskipanir

Tað darvar búskaparligu menningini í Føroyum, at **almennar stuðulsskipanir stuðla framhaldandi rakstri í vinnum, sum geva hall**. Føroyar hava fleiri sløg av slíkum stuðulsskipanum. Ein er fiskavirkisskipanin, sum fastheldur fólki í vinnum við lítlum ella ongum avkasti, ið ikki kann bjóða arbeiði alt árið, og sum forðar starvsfólkunum í at fáa sær arbeiði í øðrum vinnum, har tey høvdu kunnað givið eitt størri íkast til búskapin. Ein onnur stuðulsskipan, sum tó ikki er almenn, er minstalønin til fiskimenn og hon saman við ásetingini um brúksskyldu ger, at sjálvt um fiskiskapurin ikki ber seg búskaparliga, verður kortini fiskað. Tá stovnarnir minka, ger skipanin, at fiskiskapurin heldur fram, og stovnarnir verða fiskaðir enn longur niður. Møguleikin at fáa útlendska manning til fiskiskip, sum fiska so mikið lítið, at manningin er á minstuløn meginpartin av árinum, ger harumframt, at vit fáa arbeiðsmegi til fyritøkur, sum ikki klára at geva kappingarførar hýrur til føroyska manning. Sostatt førir skipanin til, at fyritøkur, sum annars møguliga høvdu lagt skipini, tí tey ikki klára at manna tey, nú fáa mannað tey við útlendingum, ið sostatt heldur lív í einum yvirkapasiteti í veiðiliðinum.

# Konjunkturmeting várið 2024

# 1 Bruttotjóðarúrtøka

## Meting av vøkstrinum í BTÚ

Búskaparráðið og Hagstova Føroya hava í felag mett um vøksturin í BTÚ fyri 2024 og 2025, og vegna dagførd hagtøl, endurmett vøksturin í BTÚ í leypandi prísum fyri árið 2023. Metingarnar av BTÚ verða gjørdar í leypandi prísum. Vøksturin í BTÚ í leypandi prísum er mettur til at verða ávikavist 5,4% í 2023, 4,4% í 2024 og 2,8% í 2025[1], sí talvu 1.1.

**BTÚ og BTÚ-vøkstur í leypandi prísum** **Talva 1.1**

| | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 | 2025 |
|---|---|---|---|---|---|
| BTÚ, mió. kr. | 23,0 | 25,2 | *26,5* | *27,7* | *28,4* |
| Árligur vøkstur í BTÚ | 7,7% | 9,5% | *5,4%* | *4,4%* | *2,8%* |

**Viðm.:** 2021 og 2022 er uppgerð hjá Hagstovu Føroya. 2023, 2024 og 2025 eru metingar Búskaparráðsins.
**Kelda:** Hagstova Føroya og Búskaparráðið.

Mynd 1.1 vísir føroysku bruttotjóðarúrtøkuna í ávikavist leypandi og føstum prísum í tíðarskeiðinum 2008 – 2025. Uppgjørda BTÚ var í 2022 25,2 mia. kr. í leypandi prísum og 20,2 mia. kr. í føstum prísum. BTÚ í leypandi prísum er mett at verða 26,5 mia. kr. í 2023, 27,7 mia. kr. í 2024 og 28,4 mia. kr. í 2025, sí talvu 1.1.

**BTÚ, ársins prísir og fastir 2010-prísir (leinkjað virði), 2008-2025** **Mynd 1.1**




**Viðm.:** Hagstova Føroya hevur gjørt upp BTÚ í ársins prísum og føstum prísum fyri árini 2008 til 2022. BTÚ í ársins prísum 2023 til 2025 eru metingar Búskaparráðsins.
**Kelda:** Hagstova Føroya og Búskaparráðið

Til metingina av vøkstrinum í BTÚ er nýttur ein búskaparmyndil til framrokningar, sum er mentur í Landsbankanum og síðani á Hagstovuni, ið verður viðlíkahildin av Hagstovuni og Búskaparráðnum í felag.

Konjunkturfrágreiðingin er skipað í partar eftir eftirspurnar- ella útreiðslupørtunum av BTÚ. Eftirspurningurin eftir vørum og tænastum kemur frá innlandi til nýtslu og íløgur og frá útlandi sum útflutningur. Innflutningurin er partur av innlendis eftirspurninginum og fevnir eisini um tilfarsnýtslu í framleiðsluni. BTÚ er sostatt samansett av hesum eftirspurnarpørtum:

**BTÚ = privat nýtsla + privatar íløgur + almenn nýtsla + almennar íløgur + útflutning – innflutning**

[1] Í heyst 2023 metti Búskaparráðið í samstarvi við Hagstovu Føroya, at vøksturin í BTÚ í leypandi prísum fór at verða 5,9% í 2023 og 1,4% í 2024.

## BTÚ býtt á vakstrarískoyti

Mynd 1.2 vísir vøksturin í BTÚ í leypandi prísum, og hvar árliga broytingin í BTÚ stavar frá. Vøksturin í BTÚ í leypandi prísum er mettur til 5,4% í 2023, 4,4% í 2024 og 2,8% í 2025. Vakstrarískoytini eru býtt á ávikavist privata nýtslu og íløgur, almenna nýtslu og íløgur, útflutning, innflutning og broytingar í goymslunum. Er innflutningurin størri enn árið fyri, gevur tað eitt negativt íkast til BTÚ vøksturin, tí innflutningurin so at siga er ein útreiðsla hjá føroyska búskapinum, meðan øktur útflutningur merkir økta inntøku til føroyska búskapin. Økir tað almenna ella privata sína nýtslu ella íløguvirksemi, merkir tað, at fleiri vørur ella tænastur eru keyptar í mun til árið fyri, sum er ein inntøka hjá onkrum parti av føroyska búskapinum.

**BTÚ vøkstur í leypandi prísum og vakstrarískoyti, 1999-2025** **Mynd 1.2**




**Kelda:** Hagstova Føroya hevur gjørt upp BTÚ fyri árini 1998 til 2022. 2023 til 2025 eru metingar Búskaparráðsins.

Privata nýtslan svarar í støðd til nærum helvtina av BTÚ, og gongdin í privatu nýtsluni hevur tí stóran týdning fyri vøksturin í BTÚ í mun til árið fyri. Ávísin fyri treystið hjá húsarhaldunum er sambært nýggjastu brúkarakanningini frá januar 2024 óbroytt í mun til juni 2023. Øktu livikostnaðirnir hava við sær, at tað nú skal ein størri partur av tøku inntøkuni hjá húsarhaldunum til fyri at halda somu nýtslu, sum áðrenn inflasjónin tók dik á seg. Flest øll eru í starvi og reallønin hevur verið veksandi í fleiri ár á rað fram til 2021, og hevur tað við sær, at hóast stóru príshækkingarnar, klára tey flestu at varðveita eina ávísa nýtslu. Lønarhækkan og skattalætti føra væntandi til, at privata nýtslan í minsta lagi heldur tørn, og møguliga veksur í 2024 og 2025. **Privata nýtslan** gevur eitt lítið positivt ískoyti til vøksturin í BTÚ í metingini fyri 2024 og 2025, sí mynd 1.2. Mynd 1.2 vísir somuleiðis, at ískoytið frá privatu nýtsluni og íløgunum var serstakliga stórt í 2021 og 2022. Hetta kom millum annað av, at nýtslan var størri enn vanligt í Føroyum, tá ið møguleikarnir at ferðast uttanlands vórðu avmarkaðir. Í 2023 kom positiva ískoytið frá privatari nýtslu millum annað av stóra prísvøkstrinum.

Øktu renturnar og inflasjónin ávirka, hvussu stór krøv verða sett til tiltøkupeningin, tá ið húsarhald fáa bústaðarfígging. Meklarar hava somuleiðis greitt frá, at húsarhaldini eru vorðin meira afturhaldin við at byggja nýtt. Tískil er íløguvirksemið hjá húsarhaldunum minni í metingunum fyri 2023 – 2025, enn í 2022. Tá talan er um stórar privatar fyritøkur, er íløguvirksemið eitt vet hægri í 2023 - 2025 samanborið við í 2022. Fyritøkur undir almennum ræði, ið framleiða vørur og tænastur til marknað, teljast við í samlaðu privatu íløgunum. **Privatu íløgurnar** geva eitt positivt ískoyti til vøksturin í BTÚ í 2023 – 2025, og tað stavar millum annað frá øktum íløguvirksemi hjá marknaðarliga framleiðandi almennu fyritøkunum SEV, Vága floghavn og Atlantic Airways.

**Almenna nýtslan** og íløgur eru mettar at geva eitt positivt íkast til vøksturin í BTÚ í 2024. Almennu íløgurnar geva eitt lítið positivt íkast til BTÚ í 2024, meðan íkast frá íløgunum er negativt í 2025. Almennu íløgurnar fella í 2025 samanborið við 2024, tí fleiri stórar verkætlanir enda í 2024. Almenna nýtslan gevur

hinvegin eitt positivt íkast til vøksturin í BTÚ bæði í 2024 og 2025. Samanlagt geva almenna nýtslan og íløgurnar eitt lítið positivt íkast til vøksturin í BTÚ í 2025.

Føroyski útflutningurin er á støðd við helvtina av BTÚ. Sveiggj í nøgdum og prísum á ymsu fiskasløgunum, serliga á teimum, sum vit útflyta nógv av (t.d. laksi), hevur stóra ávirkan á vøksturin í BTÚ í mun til árið fyri. Útflutningurin gav eitt positivt ískoyti til vøksturin í BTÚ 2023, millum annað orsakað av øktum útflutningi av fiskamjøli og lýsi og serstakliga høgum fiska- og lýsiprísum. Hinvegin fall tøkunøgdin av laksi. Tøkunøgdin av laksi væntast at hækka aftur í 2024 og harafturat eru væntanir um, at prísurin eisini hækkar, vegna lægri altjóða útboð av laksi. Útflutningurin av sild og toski fellur vegna fallandi kvotu av norðhavssild og av kvotum í Barentshavinum í 2024. Útflutningurin av fiskamjøli og lýsi minkar væntandi eisini, tí minni verður fiskað av makreli í 2024 samanborið við 2023, orsakað av, at kvotan helst minkar. Ófiskaðu tonsini av makreli, sum hava rullað yvirum fleiri ár, blivu fiskaði í 2023. Sostatt gevur **útflutningurin** eitt lítið negativt íkast til vøksturin í BTÚ í 2024. Útflutningurin í 2025 er enn meira torførur at meta um. Væntanir eru um, at toskakvotan í Barentshavinum og kvotan av norðhavssild eisini fella í 2025, meðan tøkunøgdin av laksi og útflutningurin av fiskafóðri, væntandi veksa. Mett verður, at útflutningurin fer at geva eitt lítið positivt ískoyti til vøksturin í BTÚ í 2025.

Innflutningur er ein útreiðsla fyri føroyska búskapin, so tá ið innflutningurin veksur, gevur tað eitt negativt ískoyti til vøksturin í BTÚ. Innflutningurin gav eitt stórt negativt ískoyti til vøksturin í BTÚ í 2022 vegna príshækkingar; eitt nú vaks innflutningsvirðið av olju nógv, tí oljan dýrkaðist. Í 2023 øktust prísirnir eisini, tó ikki eins nógv sum í 2022, millum annað fall oljuprísurin. Samanumtikið fall innflutningurin knappar 400 mió. kr. í 2023[2], og gav hann tí eitt lítið positivt ískoyti til vøksturin í BTÚ í 2023 samanborið við 2022. Í 2024 og 2025 er **innflutningurin** mettur at geva eitt lítið negativt ískoyti til vøksturin í BTÚ.

## BTÚ í føstum prísum

Hagstova Føroya hevur uppgjørt realu bruttotjóðarúrtøkuna fyri árini 2009 - 2022. BTÚ er eitt mát fyri samlaðu virðisskapanina í Føroyum. Við uppgerðini av BTÚ í føstum prísum ber til at máta, um mongdin av framleiddum vørum og tænastum veksur ella minkar uttan mun til prísgongdina. Mynd 1.3 vísir árligu broytingina í realum BTÚ. Á myndini sæst, at BTÚ í føstum prísum vaks 5,8% í 2021 og 5,4% í 2022, ið er ein hægri vøkstur enn miðalvøksturin seinastu 10 árini á 3,4%.

**Realur búskaparvøkstur, árlig broyting í BTÚ í føstum prísum, 2009 - 2022** **Mynd 1.3**




**Viðm.:** Fastir 2010-prísir, leinkjað virði.
**Kelda:** Hagstova Føroya.

Mynd 1.4 vísir árligu broytingina í bruttovirðisøkingini (BVØ) í føstum prísum fyri árini 2009 – 2022 og vakstrarískoytið til BVØ býtt á vinnugreinabólkar. BVØ er BTÚ frároknað vøruskattir (MVG og ymisk gjøld,

[2]Hagstova Føroya, tíðindi 19.02.2024.

t.d. toll- og skrásetingargjøld) og vørustudning (t.d. landbúnaðarstuðul), tí er munur á tølunum í mynd 1.3 og 1.4.

**Real bruttovirðisøking og vakstrarískoyti, 2009-2022** **Mynd 1.4**




**Viðm.:** Fastir 2010-prísir, leinkjaði virði
**Kelda:** Hagstova Føroya.

Reali búskaparvøksturin var sera stórur í Føroyum í árunum 2011 – 2014, og tað kom serliga av at tænastuvinnan vaks nógv hesi árini, eftir at hon fótaði sær eftir fíggjarkreppuna. Harafturat stavaði vakstrarískoytið eisini frá tilfeingisvinnuni. Føroyar tillutaðu sær størri makrelkvotu í 2010, og eftir tað fór útflutningurin av makreli úr 185 mió. kr. í 2009 til 885 mió. kr. í 2014. Útflutningurin av laksi vaks eisini nógv og fór úr 1,2 mia. kr. í 2009 til 3 mia. kr. í 2014. Í 2015 minkaði mongdin av útfluttum makreli og laksi í mun til árið fyri, og tí er reali búskaparvøksturin ikki eins stórur í 2015 sum í árunum frammanundan, og stóri vøksturin í tænastuvinnuni hasaði eitt sindur av. Í tíðarskeiðinum 2016 - 2018 er eisini realur búskaparvøkstur, tó ikki eins stórur sum árini 2011 - 2014. Í 2019 vaks útflutta mongdin av laksi, toski, makreli og sild í mun til árið fyri, sum gav sítt vakstrarískoyti til reala búskaparvøksturin. Covid-19 farsóttin gjørdi um seg um allan heimin í 2020, og hetta sæst aftur í gongdini í BTÚ. Lægri virksemi var í gisti- og matstovuvinnuni og í flog- og sjóflutningi, umframt at lægri nøgdir vóru útfluttar av fleiri ymsum fiskasløgum. Í 2021 og 2022 kom realur búskaparvøkstur av, at føroyski búskapurin fótaði sær eftir koronufarsóttina, umframt at útflutningurin av makreli vaks og tøkunøgdin av laksi setti met í 2021. Í 2022 stavaði helvtin av ískoytinum til vøksturin frá tænastuvinnunum og hin helvtin frá tilfeingisvinnuni; í 2022 vaks veiðan av uppsjóvarfiski, meðan tøkan í alivinnuni minkaði eitt vet.

Í talvu 1.2 sæst, hvussu samlaða virðisøkingin er býtt á ávikavist tilfeingis-, framleiðslu-, og tænastuvinnur. Eisini sæst hvussu stór vakstrarískoytini frá tilfeingis-, framleiðslu-, og tænastuvinnunum eru til samlaðu realu bruttovirðisøkingina.

**Bruttovirðisøking, 2009-2022** **Talva 1.2**

| % | Tilsamans | Tilfeingisvinnur | Framleiðsluvinnur | Tænastuvinnur |
|---|---|---|---|---|
| *Vinnubýti (Leypandi prísir)* | 100,0 | 17,4 | 18,7 | 63,9 |
| *Ískoyti til miðalvøksturin í BVØ* | 100,0 | 33,3 | 5,5 | 61,4 |

**Viðm.:** Fastir 2010-prísir, leinkjaði virði
**Kelda:** Hagstova Føroya og Búskaparráðið

Miðal vinnubýtið í talvu 1.2 vísir støddina á teimum trimum vinnugreinabólkunum. Í miðal frá 2009 - 2022 taldu tænastuvinnurnar 64%, framleiðsluvinnurnar knapt 19% og tilfeingisvinnurnar góð 17%. Miðal vøksturin í BVØ í hesum tíðarskeiði var 2,6%, og av hesum var íkastið frá tilfeingisvinnunum 33%, frá framleiðsluvinnunum 5,5% og 61% frá tænastuvinnunum.

Framleiðsluvinnur fevna um framleiðslu av vørum; t.d. matvøruídnaðurin og byggivinnan. Framleiðsluvinnurnar stóðu fyri 19% av samlaðu bruttovirðisøkingini, men høvdu bara eitt miðal árligt ískoyti til realu bruttovirðisøkingina á 5,5%. Ein orsøk til hetta kann vera, at tað eru ymiskar vinnugreinar í framleiðsluvinnunum; summar hava lítið og aðrar stórt vakstraráskoyti.

Tilfeingisvinnurnar fevna um fiskiveiðu, aling og landsbúnað. Tilfeingisvinnurnar vóru 17% til støddar og høvdu eitt miðal árligt vakstraráskoyti til realu bruttovirðisøkingina á 33%. Tað er ein triðingur av samlaða vakstraráskoytinum hesi árini. Virksemið innan uppsjóvarvinnuna og alivinnuna er vaksið nóg, har stórur partur av framgongdini stavar frá økingini av kapitalapparatinum hesi árini. Tá ið Føroyar tillutaðu sær eina væl størri makrelkvotu í árunum eftir 2009, vaks nøgdin av uppsjóvarfiski munandi, og vaksandi nøgdirnar eru høvuðsorsøkin til stóra vakstraráskoytið í árunum 2009 – 2022.

Tænastuvinnurnar fevna bæði um privatar og almennar tænastur. Almennar tænastur eru millum annað undirvísing, heilsuverk og sosialar skipanir. Sumt liggur hjá landinum og sumt hjá kommununum; kommunurnar reka til dømis barnaansing og eldrarøkt, sum er ein tænasta. Almennu tænasturnar telja fyri nærum helvtina av tænastuvinnunum. Privatar tænastur eru eitt nú flutningur (t.d. ferðafólkaflutningur loft- og sjóvegis), søla, og gisti- og matstovuvinna. Burturav øllum vinnum tilsamans, taldu tænastuvinnurnar fyri 64%, og stavaði 61% av vøkstrinum í BVØ frá hesi vinnu í tíðarskeiðinum 2009 - 2022. Tað ber ikki til at siga, júst hvar størsta bruttovirðisøkingin stavar frá (t.d. úr ávísum almennum ella privatum vinnugreinum), tí bruttovirðisøkingin í føstum prísum verður ikki uppgjørd á vinnugreinabólkar hjá Hagstovu Føroya.

Í talvu 1.3 er búskaparvøksturin fyri árini 2009 – 2022 lýstur fyri útvald norðurlond við miðal árligum vøkstri og standardfráviki. Standardfrávik merkir, hvussu nógv árligu vakstrartølini víkja frá miðalvøkstrinum og lýsa sostatt sveiggini í búskapinum. Føroyar høvdu ein miðal búskaparvøkstur á 2,8% í árunum 2009 – 2022, sum er væl størri, enn hjá hinum londunum. Føroyar hava eisini nakað størri sveiggj, ella standardfrávik (3,2%-stig), enn øll hesi lond (undantikið Ísland). Hesi lond hava eitt standardfrávik millum 1,5%- og 2,7%-stig. Um serligar orsøkir ikki eru tilstaðar, plaga størri lond at hava minni sveiggj, enn smá lond.

**Miðal realur búskaparvøkstur 2009-2022 í norðurlondum** **Talva 1.3**

| | Føroyar | Danmark | Grønland | Ísland | Noreg | Svøríki |
|---|---|---|---|---|---|---|
| *Árligur miðalvøkstur, %* | 2,8 | 1,4 | 1,0 | 1,7 | 1,4 | 1,9 |
| *Standardfrávik (sveiggj), %-stig* | 3,2 | 2,3 | 2,1 | 4,4 | 1,5 | 2,7 |

**Kelda:** Hagstova Føroya og Búskaparráðið.

Ymsar orsøkir eru til, at grannalondini sveiggja ymiskt. Til dømis hevur Ísland eitt væl størri standardfrávik; 4,4%-stig ímóti 3,2%-stigum hjá Føroyum. Hetta stavar serliga frá árunum 2009, 2010 og 2020. Í 2009 og 2010 var Ísland hart rakt av fíggjarkreppuni, tá ið stóru bankarnir kollsigldu, ið elvdi til lægri búskaparligt virksemi. Í 2020 var Ísland lutfalsliga hart rakt av Covid-19 farsóttini. Harumframt hevur tað týdning, at Ísland hevur eitt flótandi gjaldoyra. Grønland hevur hinvegin eitt standardfrávik á 2,1%-stig, sum líkist meira tí í størru londunum. Hetta kemur helst av, at stóri almenni tænastugeirin í Grønlandi, sum er fíggjaður av donsku ríkisveitingini, ger búskaparvøksturin í Grønlandi meira støðugan.

Føroyski búskapurin hevur tvær stórar høvuðsútflutningsvinnur; fiski- og alivinnuna. Umleið 90% av okkara útflutningi eru fiskavørur. Tað ger føroyska búskapin viðkvæman, tí vinnurnar eru sera tengdar at, hvussu tað gongur við fiskiskapinum og tøkuni í alivinnuni, sum m.a. eru tengd at náttúruni. Harumframt eru tær eisini tengdar at, hvussu tað gongur í londunum, sum tær útflyta til (marknaðaratgongd og eftirspurningurin í útlondunum).

**Realur búskaparvøkstur í %** **Mynd 1.5**




**Viðm.:** Fastir 2010-prísir, leinkjaði virði.
**Kelda:** Hagstova Føroya, IMF og Eurostat

Mynd 1.5 vísir realan búskaparvøkstur í útvaldum londum, sum vit útflyta til. Vístu londini hava havt positivan búskaparvøkstur í árunum 2019 – 2022 undantikið í 2020, og føroyska búskapargongdin fylgir sama mynstri. Hóast økta rentan og inflasjónin síðani 2022 hevur minkað um keypiorkuna hjá fólki úti í heimi, hevur føroyska útflutningsvinnan staðið seg væl. Hetta kemur av, at tað eru matvørur, ið vit útflyta. Eftirspurningurin eftir matvørum er vanliga nokkso støðugur uttan mun til búskaparliga gongd. Hinvegin var laksaprísurin methøgur í 2022 og 2023, ið kundi hugsast at ávirka útlendska eftirspurningin eftir laksi, men av tí at aðrar vørur, sum kunnu keypast ístaðin fyri laks; t.d. høsnarungi ella oksakjøt, eisini gjørdust nógv dýrari hesi bæði árini, var eftirspurningurin eftir laksi kortini høgur.

BTÚ í føstum prísum mátar, hvussu framleiðslan av vørum og tænastum er økt uttan mun til prísgongdina, men givið er, at tað hevur gagnað virðisskapanini í Føroyum, at vit hava fingið fyrimunarligar prísir fyri okkara útflutningsvørur. Føroyski búskapurin hevur verið í framgongd í góð 10 ár og ein partur av hesum stavar frá, at býtislutfall okkara er betrað í hesum tíðarskeiði. Býtislutfallið er lutfallið millum prísirnar á okkara útflutningsvørum í mun til prísirnar á vørunum, ið vit innflyta. Vælferðin hjá føroyingum betrast, tá ið býtislutfallið verður betri, men júst tað fangar BTÚ í føstum prísum ikki.

## Altjóða útlit

Sambært nýggjastu metingini hjá IMF (januar 2024), verður mett, at heimsbúskapurin fær eina sokallaða bleyta lending eftir stóru prís- og rentuhækkarnar síðani á sumri 2022. IMF væntar, at vøksturin í heimsbúskapinum fer at gerast 3,1% í 2024 og 3,2% í 2025 (í føstum prísum). Hetta er eitt vet hægri, enn IMF metti í oktober 2023 (2,9% fyri 2024), ið kemur av, at amerikanski búskapurin eins og búskapurin í mongum øðrum framkomnum og menningarlondum, hevur staðið seg betri, enn væntað.

Ein vøkstur í heimsbúskapinum á 3,1% er lágt søguliga sæð, tí í árunum 2000 – 2019 var árligi búskaparvøksturin 3,8% í miðal, men mongu rentuhækkingarnar eru við til at tálma búskaparvøksturin.

Fyri búskaparvøksturin í Evropa metir IMF ein lægri vøkstur enn vøksturin í heimsbúskapinum. Teirra meting fyri Evropa er ein búskaparvøkstur á 0,9% í 2024 og 1,7% í 2025.

Sambært kanning hjá evropeiska miðbankanum, ECB, er inflasjónin í Evropa mett at lækka frá 2,4% í 2024 til 2% í 2025 og 2026. Tað er lægri, enn áður mett (juli 2023), tá ið inflasjónin varð mett at gerast 2,7% í 2024, 2,2% í 2025 og 2,1% í langa høpinum. ECB miðar eftir eini inflasjón á 2% árliga[3].

[3] Keldur: Economic Outlook, Nordea, januar 2024.
World Economic Outlook update, Januar 2024, imf.org.

# 2 Privat nýtsla og íløgur

## Treystið hjá húsarhaldunum

Gongdin í privatu nýtsluni hevur stóra ávirkan á BTÚ, tí privata nýtslan er í stødd á støði við vøruútflutningin og -innflutningin. Nýtslan hjá húsarhaldunum er í stóran mun tengd at teirra bjartskygni. Vísitalið fyri brúkaran, sigur nakað um, hvussu brúkarin metir at tíðirnar eru.

Í nýggjastu brúkarakanningini hjá Hagstovuni (januar 2024) sæst, at treystið hjá føroysku húsarhaldunum ikki er fallið, húsarhaldini eru framvegis við gott mót, sí mynd 2.1. Brúkaravísitalið er óbroytt samanborið við kanningina frá juni 2023, og harumframt er lýsingin av aktuellu fíggjarstøðuni hjá húsarhaldunum óbroytt. Størsti parturin av húsarhaldunum (áleið 60%) spara nakað upp. Seinastu 10 árini hava føroysk húsarhald økt um síni innlán í føroysku bankunum[4], ið bendir á, at tey hava økt um sína uppsparing. Innlánsvøksturin minkaði tó eitt vet í tíðarskeiðinum frá umleið árslok 2021 til á vári 2023, ið kann vera tekin um, at húsarhaldini í hesum tíðarskeiði brúktu burturav síni uppsparing. Síðani apríl 2023 er vøksturin í innlánum hjá húsarhaldunum øktur aftur. Ein orsøk til vøksturin í innlánunum kann vera, at húsarhaldini hava vant seg við nýggju støðuna við øktum prís- og rentustøði, ið ger tað lættari at leggja ætlanir um nýtslu og samansparingar. Væntanir um lækkandi rentu og inflasjón, lønarhækking umframt skattalættin frá 2024, kann eisini viðvirka til, at fíggjarligu útlitini tykjast meira bjørt, og at tað tí aftur er rásarúm fyri samansparing.

Talið av teimum, ið júst fáa endarnar at røkka saman, er somuleiðis óbroytt samanborið við seinastu kanning, ið helst stendst av, at flest øll hava eitt starv í dag. Húsarhaldini vænta sambært brúkarakanningini, at teirra fíggjarstøða verður betri um eitt ár, ið kann hanga saman við, at húsarhaldini hava væntanir um, at prísirnir ikki fara at vaksa í sama mun komandi árið, sum teir hava gjørt í serliga 2022 og 2023. Harafturat hava flest fingið lønarhækkan og eisini er skattalætti givin í 2024. Hinvegin eru húsarhaldini minni bjartskygd, tá tað kemur til føroysku búskaparstøðuna komandi ár.

**Vísital - samlað brúkaravísital fyri føroysku húsarhaldini, jan-06 til jan-24** **Mynd 2.1**




**Kelda:** Hagstova Føroya.

Í mynd 2.1 sæst, at bjartskygnið hjá húsarhaldunum gjørdist serliga lágt undir fíggjarkreppuni, og tá var arbeiðsloysið samstundis sera høgt (sí mynd 2.2). Mynd 2.2 vísir, at løntakaratalið í dag er søguliga høgt (27.664 í januar 2024) og at arbeiðsloysi er søguliga lágt (1% í januar 2024 ella 282 fulltíðararbeiðsleys). Støðug tilgongd av útlendskari arbeiðsmegi hevur verið seinastu mongu árini, og tað sæst aftur í

Results for the ECB Survey of Professional Forecasters for the first quarter of 2024, ecb.europa.eu.

[4] Húsarhald, NPISH ikki íroknaði. Kelda: Landsbanki Føroya, MFI hagtøl.

løntakarahagtølunum. Eftirspurningurin eftir arbeiðsmegi er enn stórur og arbeiði er til allar hendur. Tað merkir, at tey allarflestu kunnu varðveita eina ávísa nýtslu.

**Tal av løntakarum og fulltíðar arbeiðsleysum, jan-08 til jan-24** **Mynd 2.2**




**Viðm.:** Árstíðarjavnað.
**Kelda:** Hagstova Føroya.

## Prísvøkstur

Prísirnir veksa framvegis, men ikki eins nógv, sum teir hava tað seinasta árið. Í fjórða ársfjórðingi 2023 vaks brúkaraprístalið við 2,8%, og tað er munandi lægri, enn vøksturin í brúkaraprístalinum hevur verið síðani annan ársfjórðing 2022, sí mynd 2.3. Meðan oljuprísirnir høvdu størstu ávirkanina á brúkaraprístalið í byrjanini av 2022, hevur tað síðani verið øktir matvøruprísir, ið hava togað brúkaraprístalið upp.

**Inflasjón, %-broyting í brúkaraprístalinum, mai-12 til nov-23** **Mynd 2.3**




**Viðm.:** Prosentbroyting í brúkaraprístalinum í mun til sama ársfjórðing árið fyri.
**Kelda:** Hagstova Føroya.

Í fyrsta ársfjórðingi 2023 var tað í mesta mun dýrkaðar matvørur, rentuútreiðslur og streymprísir, sum togaðu prísvøksturin upp, og í øðrum ársfjórðingi 2023 vóru tað rentuhækkingar og dýrkaðar matvørur, sum gjørdu seg galdandi. Í fjórða ársfjórðingi 2023 høvdu øktu rentuúreiðslurnar størsta ávirkan á brúkaraprístalið. Matvørurnar hækkaðu eisini í fjórða ársfjórðingi 2023, men í minni mun, enn tær hava gjørt síðani prísirnir byrjaðu at veksa í 2022.

Í mynd 2.4 eru teir 3 vørubólkarnir, sum fylla mest í nýtsluni hjá húsarhaldunum, vístir. Tann vørubólkurin, sum fyllir mest er matur og alkoholfríar drykkjuvørur, og prísvøksturin í hesum vørubólkinum er øktur nógv síðani miðjan 2021. Flutningur er útreiðslur til keyp og rakstur av bili íroknað brennievni til bilin. Vørubólkurin 'býli' hevur størsta prísvøksturin. Í bólkinum fyllir oljunýtsla til upphiting av húsunum ein stóran part, men eisini elnýtsla og rentuútreiðslur.

Tað hava verið 10 rentuhækkingar síðani á sumri 2022. Í juli 2022 rindaðu føroysku húsarhaldini í miðal 2,8% í rentu á síni bústaðarskuld í føroysku bankunum. Í desember 2023 rindaðu tey 5,11% í rentu; tað er ein øking á 82%. Rentuútreiðslurnar hjá húsarhaldunum til bústaðarskuld eru sostatt øktar við 82% í hesum tíðarskeiði. Hjá føroyingum, ið hava fíggjað síni sethús við einum donskum realkredittláni, er miðalrentan økt við 50% (íroknað bidrag). Økingin er ikki eins stór á donsku realkredittrentuni, sum á føroysku bústaðarrentuni. Orsøkin er bæði tann, at donsku realkredittrenturnar byrjaði at hækka eitt sindur áðrenn tær føroysku (tí verður broytingin ikki eins stór í nevnda tíðarskeiðinum), og tann, at rentan ikki er økt hjá teimum, ið hava fastrentaði realkredittlán. Tey, ið hava eitt realkredittlán við einum rentubindingartíðarskeiði, sum gongur út í næstum, fara tó at merkja rentuhækkingarnar komandi tíðina[5].

Tað eru sostatt ikki bert dýrkaðu gerandisvørurnar, sum skerja tiltøkupeningin hjá føroysku húsarhaldunum, men eisini øktu rentuútreiðslurnar. Rentan og inflasjónin hava annars verið lág seinasta áratíggju, samstundis sum lønirnar eru øktar; lønarhækkingarnar hava fyri tað mesta verið størri enn prísvøksturin seinastu mongu árini, og tað merkir, at húsarhaldini hava fingið ein reallønarvøkstur øll hesi árini. Økta inflasjónin hevur tó minkað um henda reallønarvøkstur síðani á sumri 2021 (sí fylgiskjal 1).

**Brúkaraprístalið, útvaldir vørubólkar, %-broyting, mai-12 til nov-23** **Mynd 2.4**




**Viðm.:** Prosentbroyting í brúkaraprístalinum í mun til sama ársfjórðing árið fyri.
**Kelda:** Hagstova Føroya.

Sambært peningastovnunum eru tað ikki fleiri húsarhald, enn vanligt, sum biðja um skáar, og trotini eru ikki størri, enn tey plaga at vera. Bankarnir meta tó, at privatkundarnir eru vorðnir eitt sindur meira varnir síðani rentan og prísstøðið byrjaði at hækka, tá ið tey skulu keypa bil ella sethús. Líkt er til, at føroysku húsarhaldini hava fíggjarligt rásarúm til at kunna lofta øktu rentuútreiðslunum og dýrkaða livikostnaðinum higartil, men enn er ov tíðliga at siga, um vit hava sæð allar avleiðingarnar av mongu rentuhækkingunum, siga peningastovnarnir.

## Nýtslan hjá húsarhaldunum

Tá ið ein størri partur av tøku inntøkuni skal nýtast til rentur, er minni eftir til aðra nýtslu. Harumframt eru vørurnar og tænasturnar dýrkaðar nógv síðani á sumri 2022, og tað hevur minkað munandi um keypiorkuna hjá húsarhaldunum. Føroysku húsarhaldini hava brúkt fleiri krónur og oyru í 2023 enn

[5] Landsbanki Føroya.

undanfarin ár, men kortnýtslan frároknað prísvøkstur vísir, at nýtslan hjá húsarhaldunum var lægri í seinna hálvári 2022 og 2023, enn í sama tíðarskeiði í 2021, ið merkir, at minni fæst fyri pengarnar, sí mynd 2.5 (og 2.8a og b).

**Kortnýtsla hjá føroyingum í Føroyum og uttanlands samanlagt, jan 21 til des 23** **Mynd 2.5**




**Kelda:** Bank Nordik og Betri Banki. Hagtølini eru deflateraði við brúkaraprístalinum (egnar útrokningar).

Mynd 2.6 vísir gongdina í lønargjaldingum og MVG-inntøkum landskassans. Fram til fíggjarkreppuna í 2008 vaks lutfallið millum MVG og lønargjaldingar munandi; tað vil siga, at húsarhaldini nýttu ein stóran part av tøku inntøkuni til nýtslu. Eftir 2008 hendi eitt stórt fall í lutfallinum. Síðani 2009 hevur hetta lutfallið somuleiðis víst eina fallandi gongd, og svarar hetta til, at lønirnar eru vaksnar skjótari enn MVG-inntøkur landskassans. MVG-inntøkurnar vuksu undir Covid-19, av tí at fólk ikki kundu fara uttanlands at ferðast, og tí nýttu ein størri part av inntøkuni í Føroyum.

**Gongdin í lønum og MVG, jan-98 til des-23** **Mynd 2.6**




**Viðm.:** Tølini byggja á leypandi 12 mánaðar samanlegging fyri tíðina frá januar 1998 til og við seinast dagførdu tølunum.
**Kelda:** Egnar útrokningar við støði í lønartølum Hagstovunnar og MVG-tølum frá TAKS.

Síðan 2023 eru MVG-inntøkurnar falnar eitt vet, og tað kann koma av, at fólk aftur er farin at ferðast og keypa klæðir og annað uttanlands, men tað kann eisini benda á eitt ávíst varsemi í privatu nýtsluni. Tí síggja vit, at lutfallið millum MVG-inntøkur og lønarinntøkur aftur er fallið. Gongdin í innflutninginum á mynd 2.7, gevur eisini ábendingar um varsemi í nýtsluni hjá húsarhaldunum. Innflutningurin av hálvdrúgvum og drúgvum nýtsluvørum hevur verið fallandi síðan fyrsta ársfjórðing 2022, tað vil siga,

síðan inflasjónin veruliga tók dik á seg. Hinvegin er innflutningurin av ódrúgvum nýtsluvørum vaksin, sum millum annað eru matvørur (tó hasar vøksturin av í 2023).

**Lønarinntøka og innfluttar nýtsluvørur hjá húsarhaldum, jan-98 til des-23** **Mynd 2.7**




**Kelda:** Hagstova Føroya og egnar útrokningar.

Mynd 2.8a og b vísir smásøluvísutalið fyri handlar, sum selja ávíkavist mat-, drykkju- og tubbaksvørur, húsarhaldsútgerð, og klædnapløgg. Myndin til vinstru er í ársins prísum, meðan myndin til høgru er í føstum prísum, tað vil siga at mynd 2.8b vísir seldu mongdina. Á myndunum sæst, at í samsvar við at inflasjónin er økt, er sølan økt í virðum av mati-, drykkju- og tubbaksvøru, men lækkað, tá ið mátað verður í mongdum. Tað merkir, at húsarhaldini brúka fleiri krónur, men fáa minni fyri peningin, tá ið tey keypa mat- og drykkjuvørur, enn áðrenn inflasjónin byrjaði at hækka. Handilsvinnan boðar frá, at nýtslumynstrið hjá brúkarunum er broytt; tey keypa í størri mun lágprísvørur og í minni mun eitt nú vistfrøðiligar vørur.

**Smásøluvísitøl, 1. ársfjóðring 2001 til 3. ársfjóðring 2023**

**Í ársins prísum** **Mynd 2.8a**




**Í føstum prísum** **Mynd 2.8b**




**Kelda:** Hagstova Føroya

Á myndunum 2.8a og b sæst eisini, at sølan í handlum, sum selja húsarhaldsútgerð og klæðir, er fallin í bæði nøgd og virði. Undir Covid-19 vaks sølan av klæðum nógv, tí fólk keyptu klæðir í Føroyum, heldur enn uttanlands. Síðani eru fólk aftur farin at ferðast, men hvørt sølan av klæðum er lækkað, tí fólk aftur keypa uttanlands, ella tí tey eru vorðin meira varin, er torført at siga. Hinvegin verður

húsarhaldsútbúnaður vanliga keyptur í Føroyum, tí bendir minkingin í sølu í handlum, sum selja húsarhaldsútbúnað, sannlíkt á eitt økt varsemi.

Eitt lyklatal, ið kann geva ábendingar um privatu nýtsluna, er søla av persónbilum. Tá ið fólk gerast meira varin, gongur tað serliga útyvir drúgvar vørur, og serliga størru íløgurnar, so sum bilar. Fólk kunnu útseta at keypa sær nýggjan bil, ella tey kunnu velja at keypa ein brúktan bil ístaðin fyri ein nýggjan. Sølan av nýggjum persónbilum til privata nýtslu er lækkað nógv síðani 2020 og serliga var afturgongdin stór í 2022 (37%). Tilsamans lækkaði sølan av nýggjum og brúktum persónbilum til privata nýtslu 17% frá 2021 til 2022 og aftur 7% frá 2022 til 2023, sí mynd 2.9.

**Søla av persónbilum til privata nýtslu, 2020-2023** **Mynd 2.9**




**Kelda:** Akstovan

Keypsmynstrið av bilum er eisini broytt seinastu árini. Í 2020 var sølan av nýggjum persónbilum til privata nýtslu 17% og í 2023 var hon 12% av samlaðu bilasøluni (grøna økið í stabbunum). Brúktbilasølan er farin úr 77% í 2020 upp til 84% í 2023 (bláa økið). Harafturat eru fólk í størri mun farin at innflyta brúktar bilar. Brúktu bilarnir, sum vera innfluttir, eru tó nýggjari, enn teir vóru fyri umleið 10 árum síðani; 74% av innfluttu brúktu persónbilunum vóru yngri enn 3 ár í 2023, í 2015 vóru 28% yngri enn 3 ár. Innflutningurin av brúktum persónbilum til privata nýtslu vaks serliga frá 2020 til 2021 (vaks úr 51 uppí 154 bilar). Sølan av brúktum leigubilum var áleið 450 í 2020-22, men lækkaði niður í 126 í 2023. Afturat hesum skal viðmerkjast, at mongdin av leigubilum er økt munandi seinastu árini. Hon var størst í 2023 við 1.235 leigubilum, og burturav hesum vórðu 11% útfluttir aftur aftaná lokna ferðavinnuháárstíð.

## Sethúsamarknaðurin

Inflasjónin hevur fingið bankarnar at seta størri krøv til tiltøkupeningin, tá biðið verður um sethúsalán, og tað ávirkar, hvussu nógv húsarhaldini kunnu bjóða uppá eini sethús. Meklarar greiða frá, at tað nú eru færri, ið bjóða uppá ognirnar, og at fyrstuferðskeypararnir eftir mongu rentuhækkingarnar hava uppaftur verri við at sleppa inn á sethúsamarknaðin. Harafturat er byggitilfarið dýrkað so mikið nógv, at fólk eru vorðin meir afturhaldin við at byggja nýtt ella at keypa sethús, sum krevja umvæling.

Meklarar siga frá, at tað er broyting í eftirspurninginum eftir sethúsum. Tey, ið skulu ogna sær sethús fyri fyrstu ferð, hava verri við at keypa hús í miðstaðarøkinum, eftir at rentan og inflasjónin er økt, og tað hevur millum annað havt við sær, at eftirspurningurin eftir sethúsum úti á bygd er øktur.

Í árunum 2019 – 2021 var ikki óvanligt, at sethúsini vóru seld, áðrenn tey náddu at koma á sølulistan, ella at boð fóru uppum útboðsprísin beinanvegin. Liggitíðin er longd eitt sindur, tó at sølan gongur skjótari nú enn í mun til fyri einum ári síðani. Tað vil siga, at tað tekur longri tíð at selja. Stundum verður boðið undir útboðsprísin, hóast endaligi søluprísurin kortini, sum oftast endar á prísuppskotinum ella hægri. Talið av framvísingum og boðum er minkað, og tað hongur saman við, at bankarnir seta størri krøv.

Mynd 2.10 vísir gongdina í sethúsaprísum fyri tíðarskeiðið 1985 - 2023. Í Tórshavn er miðalprísurin í 2023 óbroyttur í mun til 2022, meðan hann var 5% lægri í størru bygdunum í mun til í 2022. Størru bygdirnar hava annars havt stóran vøkstur í sethúsaprísunum seinastu árini, millum annað vegna Eysturoyartunnilin, ið hevur minkað um frástøðuna til miðstaðarøkið.

**Miðalprísir fyri sethús, 1985 til 2023** **Mynd 2.10**




**Viðm.:** Tórshavn fevnir um miðstaðarøkið (Tórshavn, Hoyvík og Argir).
**Kelda:** BankNordik.

Í smærri bygdunum var miðalprísurin á sethúsum góð 8% hægri, enn í 2023, meðan hann var lækkaður við umleið 20% í Sandoy/Suðuroy í sama tíðarskeiði. Neyðugt er at hava fyrivarni fyri prísbroytingunum í smærri bygdunum og í Suðuroy og Sandoy, tí har eru lutfalsliga fáar sølur, og tað ger, at einkultar sølur kunnu toga miðalprísin annan vegin[6].

**Sethúsaprísir og tøk inntøka, 1998 til 2023** **Mynd 2.11**




**Viðm.:** Sethúsaprísirnir umboða miðstaðarøkið. Nýggjastu hagtølini kunnu vera heft við óvissu. Realir sethúsaprísir eru deflateraðir við brúkaraprístalinum. Tøk inntøka er frá hagtølunum persónligir skattgjaldarar fram til og við 2021. Vøksturin í tøku inntøkuni í 2022 og 2023 er meting Landsbankans út frá vøkstrinum í lønargjaldingum.
**Kelda:** BankNordik (sethúsaprísir), Hagstova Føroya (tøk inntøka, persónligir skattgjaldarar), Landsbanki Føroya (meting av tøku inntøkuni fyri 2022 og 2023).

Treka útboðið av bústøðum hevur saman við stóra fólkavøkstrinum og lágu rentunum seinastu mongu árini verið við til at trýsta sethúsaprísirnar upp; sethúsaprísirnir eru í fleiri ár á rað øktir munandi

[6] Kelda: BankNordik.

samanborið við inntøkurnar hjá húsarhaldunum. Í 2023 stóðu sethúsaprísirnir í miðstaðarøkinum hinvegin í stað í mun til árið fyri, meðan tøka inntøkan vaks, sí mynd 2.11.

Bústaðarbyrðan[7] vaks í árunum 2015 – 2021 orsakað av hækkandi sethúsaprísum, tí í hesum tíðarskeiði vóru renturnar lágar og inflasjónin lág, meðan lønarinntøkurnar vuksu og eftirspurningurin eftir bústøðum var stórur. Rentuhækkingarnar hava elvt til at bústaðarbyrðan er økt, sjálvt um sethúsaprísirnir standa í stað[8].

Mangul á bústaðir er ein týðandi fløskuhálsur, sum er við til at forða fyri framhaldandi fólka- og búskaparvøkstri. Búskaparráðið metir tað vera umráðandi, at kommunur við stórum fólkavøkstri framskunda útstykkingar av grundstykkjum - serliga til bygging av íbúðum og øðrum smærri bústaðareindum, so bráfeingistørvurin skjótari verður nøktaður, og at landið somuleiðis ger sítt íkast við at byggja leigubústaðir. Harumframt kunnu Airbnb og líknandi leiguportalar leggja trýst á bústaðarmarknaðin. Tað kann vera vert at hyggja at, hvat onnur lond gera á hesum økinum.

## Treystið í vinnuni

Mynd 2.12 vísir samlaða vísitalið í føroyska búskapinum hjá bæði brúkarum og vinnu. Myndin vísir, at hóast treystið hjá brúkarunum er óbroytt, er støðan ikki hin sama hjá vinnuni. Treystitalið er lækkað úr 6 í juni 2023 til -1 í januar 2024. Í høvuðsheitum er tað treystið í handils- og privatu tænastuvinnunum, umframt tilfeingis- og ídnaðarvinnum, sum er fallið. Treystið í byggivinnuni er hinvegin framvegis gott.

Ávísin fyri **tilfeingisvinnuna** og annan ídnað er lækkaður eitt vet síðani seinastu kanning, og er nú -19. Tilfeingisvinnan boðar millum annað frá lægri eftirspurningi og størri goymslum av liðugtvørum, tó eru væntanir um príshækkingar. Vegna fallandi kvotu av sild, og toski í Barentshavinum, vaksa prísirnir av hesum fiskasløgum væntandi í ár. Harumframt væntast ein stígur í altjóða útboðnum av laksi, ið helst merkir, at laksaprísurin hækkar.

**Handilsvinnan** letur verri at. Ávísin hjá handilsvinnuni í nýggjastu kanningini frá januar 2024 er -27. Handilsvinnan boðar frá stórum goymslum og væntar minni sølu í 2024. Stóri prísvøksturin hevur ávirkað handlarnar ymiskt. Smásøluvísitalið vísir, at húsarhaldini brúka meira pengar uppá gerandisvørur, hóast nøgdirnar eru falnar. Hinvegin er sølan av húsarhaldsútgerð og klæðum fallin í nøgd og virði, ið helst merkir, at tá størri partur av tiltøkupeninginum fer til mat, er minni eftir til aðrar vørur (mynd 2.8).

Ávísin hjá privatu **tænastuvinnuni** er fallin frá 33 niður í 19 í nýggjastu kanningini. Fallandi bjartskygnið kemur av, at privata tænastuvinnan metir, at sølan seinasta árið ikki hevur verið nøktandi. Hinvegin vísir konjunkturbarometrið, at privata tænastuvinnan er eitt vet meira bjartskygd um eftirspurningin í 2024. Ferðavinnan sigur frá, at fleiri ferðafólk hava verið í Føroyum í 2023 enn í 2022, tó er vøksturin ikki stórur. Ein lítil afturgongd á umleið 4% var tó á talinum av gistingum hjá gistingarhúsunum í 2023 í mun til 2022[9]. Summarið 2023 var heldur óvist, tí ferðafólk bíløgdu í seinastu løtu, men hendan gongdin tykist at vera vend, tí longu nú við ársbyrjan 2024, eru tað komnar nógvar bókingar til summarið og heystið 2024 frá ferðafólki og bólkum. Hotellini vænta ein lítlan vøkstur í gistingum komandi árið, men merkja økta kapping um at bjóða út gisting frá eitt nú Airbnb.

Vísitalið hjá **byggivinnuni** kvinkar eitt vet upp. Fleiri stórar verkætlanir eru í gongd og byggivinnan hevur í miðal ordrabókur fullar 1 ár fram, ið er eitt vet lægri enn í seinastu kanning juni 2023. Onnur hvør byggifyritøka boðar frá, at trot á arbeiðsmegi er størsta forðingin í framleiðsluni, meðan ein lítil helvt boðar frá, at ongar avmarkingar eru í framleiðsluni. Búskaparráðið hevur áður gjørt vart við, at tað er heldur óheppið at tað almenna, tað vil siga land og kommunur, leggja óneyðugt trýst á byggivinnuna við at seta í gongd stórar byggiverkætlanir í góðum tíðum, samstundis sum tað privata ger stórar íløgur. Hetta tí eftirspurningurin hjá tí almenna økir uppaftur meira um eftirspurningin eftir arbeiðsmegi í

[7] Bústaðarbyrðan er tann parturin av tøku inntøkuni, sum fer til at gjalda bústaðarlán.
[8] Betri Banki.
[9] Hagstova Føroya, Tíðindi, 31. Januar 2024.

byggivinnuni, sum elvir til lønartrýst í byggivinnuni, og harvið dýrkar byggiverkætlanirnar hjá bæði tí almenna og privata, umframt upptekur arbeiðsmegi, ið annars kundi nøkta eftirspurningin hjá tí privata.

**Treystitalið fyri brúkarar og vinnuna, jan-07 til jan-2024** **Mynd 2.12**




**Viðm.:** Konjunkturbarometur. Samanvigaður ávísi frá 5 kanningum fyri brúkarar og 4 vinnubólkar. Brúkarar 20%, tilfeingisvinnur o.a. Ídnaður 40%, byggivinnan 5%, handilsvinnan 5% og tænastuvinnur 30%
**Kelda:** Hagstova Føroya.

## Trot á arbeiðsmegi og útlendsk arbeiðsmegi

Føroyar hava í longri tíð havt søguliga lágt arbeiðsloysi (sí mynd 2.2), og ein stór avbjóðing fyri búskapin er tí trot á arbeiðsmegi. Innan almennar tænastur merkja borgarar longu nú avleiðingarnar av starvsfólkatrotinum; eitt nú tá foreldur ikki fáa ansað sínum børnum fulla tíð, og tá ellisheim mugu steingja stovur, tí teimum vanta starvsfólk.

Búskaparráðið metti á vári 2021, at tørvur fer at verða á 1.000 fleiri starvsfólkum innan eldrarøkt, áleið 100 fleiri sjúkrarøktarfrøðingar til sjúkrahúsverkið, og nærum 800 eyka starvsfólk til almannaverkið komandi árini [10]. Hetta er metti starvsfólkatørvurin, áðrenn eina møguliga stytta arbeiðsviku. Demografiska gongdin í Føroyum við veksandi tali av eldri fólki hevur við sær, at tørvurin á millum annað eldrarøkt og sjúkrarøkt økist í framtíðini, og sostatt veksur starvsfólkatørvurin eisini innan hesi økir. Øktur livialdur og broytingar í aldurssamansetingini í búfjøldini er eitt altjóða fyribrigdi. Flestu lond í vesturheiminum hava somu demografisku avbjóðingar sum Føroyar, við vaksandi tali av eldri fólki. Hesi lond fara somuleiðis at mangla arbeiðsmegi. Tí verður kappingin um arbeiðsmegina enn størri í framtíðini.

Sambært kanning hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag mangla føroysku fyritøkurnar 220 starvsfólk sum nú er, og privati arbeiðsmarknaðurin fer at mangla 750 starvsfólk komandi 5 árini[11]. Sambært kanningini fáa fyritøkurnar ikki loyst allar sínar uppgávur, tí trot er á arbeiðsmegi, og tað merkir í roynd og veru, at føroyski búskapurin ikki fær tann vøksturin, ið hann annars hevði fingið, um atgongd var til arbeiðsmegi. Summar fyritøkur meta seg missa arbeiðsmegi til útlond orsakað av serskattaskipanum. Eitt nú boðar byggivinnan frá, at tað í løtuni er øktur eftirspurningur úr Noregi eftir føroyskum handverkarum. Í hesum høpi er ikki skynsamt at hava serskipanir, sum geva skattligan fyrimun at arbeiða uttanlands. Tí er tað eitt stig á røttu leiðini, at politiska skipanin hevur tillagað skattareglurnar fyri føroyingar, ið arbeiða uttanlands, so tað gerst minni lønsamt frameftir at leggja sína arbeiðsorku í útlondunum ístaðin fyri í Føroyum. Samdøgursfrádrátturin, ið verður latin afturfyri meirútreiðslur, sum standast av at arbeiða uttanlands, fellur stigvíst fram til 2026. Í 2023 vórðu 300 kr. um samdøgrið drignar frá skattskyldugu inntøkuni, og hetta fellur stigvíst niður til 120 kr. um samdøgrið. Uttanlandsfrádrátturin minkar eisini hesi

[10] Evnisfrágreiðing Búskaparráðsins um vælferðarøkið, várið 2021.
[11] Útvarpstíðindi 19.01.2024 "Privati arbeiðsmarknaðurin fer at hava tørv á 750 starvsfólkum" og samrøða við stjóran í Vinnuhúsinum.

árini. Fólk, ið arbeiða uttanlands og gjalda skatt av lønarinntøkuni uttanlands, kunnu fáa frádrátt í føroyska skattinum. Frádrátturin er 30% av inntøkuni um árið, tó var tað í mesta lagi 120.000 kr. í 2023[12]. Hámarkið á frádráttinum minkar við 60.000 kr. um árið fram til 2026, har frádrátturin í mesta lagið verður 48.000 kr. Tað er stig á røttu leið at minka um frádráttirnar til fólk, sum arbeiða uttanlands, men Búskaparráðið er av tí fatan, at allar serskattaskipanir, sum eggja fólki at arbeiða uttanlands heldur enn í Føroyum, eiga at vera avtiknar.

Líkt er til, at trotið á arbeiðsmegi verður ein trupulleiki mong ár fram. Búskaparráðið metir, at tað er neyðugt at politiska skipanin fremur nýskipanir, sum økja um arbeiðsútboðið hjá føroyingum. Kortini eru ætlanir um at stytta arbeiðsvikuna, sum minkar um arbeiðsútboðið. Lægri arbeiðsútboð kann viðføra, at tað verður alsamt torførari at veita tær somu vælferðartænasturnar, sum vit hava í dag, tá talið av teimum, sum hava tørv á hesum vælferðartænastum hækkar. Í síðsta enda er avleiðingin av varandi starvsfólkatroti, at framleiðslan í landinum, og harvið vælferðin, verður minni, enn hon kundi verið. Politiska skipanin eigur at fremja tiltøk, ið eru við til at økja um arbeiðsútboðið í Føroyum.

Um arbeiðsloysið er minni enn 3,5%, ber til at fáa útlendingar til Føroya at arbeiða. Føroyar hava tvær sokallaðar “fast-track” skipanir, sum geva arbeiðsgevarum møguleika á ein lættan og skjótan máta at innflyta útlendska arbeiðsmegi. Útlendsk arbeiðsmegi hevur fleiri ávirkanir á føroyska búskapin. Tá ið arbeiðsloysið er lítið, og trot er á arbeiðsmegi, ber tað til at fáa útlendingar hendan vegin. Tað forðar fyri møguligum fløskuhálsum á føroysku arbeiðsplássunum og økir um framleidnið hjá fyritøkunum í landinum. Avbjóðingar við ovhitan av búskapinum og trot á arbeiðsmarknaðinum kunnu basast, um arbeiðsmegin kann flyta seg frítt ímillum lond. Tilflyting av arbeiðsmegi kann tískil økja um búskaparliga virksemið og búskaparvøksturin, um arbeiðsmegin kemur til fyritøkur og vinnur, sum geva íkast til búskapin. Hóast innflutta arbeiðsmegin í fleiri førum er ein fyrimunur fyri búskapin í stutta høpinum, nýtist hon ikki at verða ein fyrimunur, eitt nú tá tær vinnurnar sum innflyta arbeiðsmegina, vegna almennan stuðul bera við sær ein yvirkapasistet, sum til dømis er støðan í botnfiskaflotanum.

Í langa høpinum kunnu fast-track skipanirnar í verandi líki hava nakrar vansar við sær. Fólk við arbeiðsuppihaldsloyvi kunnu søkja um varandi uppihaldsloyvi eftir 7 árum, og tá fáa tey rætt til allar almennar tænastur og veitingar. Tí kann væntast, at summi sum koma til Føroyar við einum arbeiðsloyvi, koma við tí fyri eyga at verða verandi. Neyðugt er sostatt at hava ein immigrasjónspolitikk, og at krøv um millum annað integrasjón verða sett teimum, sum flyta til landið at arbeiða ella fáa samfylgjandi familju til Føroya. Harafturat eigur politiski myndugleikin at taka avgerð um, hvørji fólk tey ynskja skulu koma til landið, umframt hvørjar vinnur hava brúk fyri at innflyta arbeiðsmegi. Í løtuni er tað vinnan, tað vil siga tær fyritøkur, sum eru undangóðkendar til fast-track skipanirnar, sum í stóran mun avgera hvørjir útlendskir arbeiðarar, og harvið hvørjir førleikar, koma til landið.

Mynd 2.13 vísir, hvussu stórt lutfall av løntakarunum í útvaldum vinnum eru útlendingar. Myndir vísir, at fiskavøruídnaður er tann vinnugreinin, ið hevur flest útlendingar sum prosentpart av løntakarunum; í desember 2023 vóru 28% av løntakaranum í hesi vinnuni útlendingar. Á myndini sæst, at luturin av útlendskum løntakarum er vaksin við 7%-stigum síðani nýggja fast-track skipanin varð sett í verk síðst í 2021. Luturin av útlendskum løntakarum á ali- og kryvjivirkjum er vaksin nógv síðan 2020, og vóru 18% av løntakarunum útlendingar í hesi vinnugreinini í desember 2023. Fjórði hvør løntakari í gisti- og matstovuvinnuni var útlendingur í desember 2023. Eisini í hesi vinnuni er talið vaksið nógv, síðan nýggja fast-track skipanin varð sett í verk. Luturin av útlendingum, sum arbeiða innan húsarhaldstænastur hevur ligið um 17% siðan 2017. Innan tað almenna arbeiða fáir útlendingar.

Tá fyritøkur og vinnur ikki geva samfelagsligt avkast, so minkar teirra virksemi um virðisskapanina í samfelagnum. Tað er ikki skynsamur vinnupolitikkur og darvar búskaparmenningini í Føroyum, at almennar stuðulsskipanir yvir longri áramál stuðla framhaldandi rakstri í ávísum vinnum. Stuðulsskipanir eru ósunnar fyri flytføri av arbeiðsmegi millum vinnur. Ein teirra er fiskavirkisskipanin, ið heldur fólki føstum í vinnum við lítlum ella ongum avkasti, og sum ikki kann bjóða arbeiðsfólkunum arbeiði alt árið. Fiskavirkisskipanin forðar fólki í at fáa sær arbeiði í øðrum vinnum, har tey høvdu kunna givið eitt størri íkast til búskapin. Úrslitið av hesi stuðulsskipanini er, at vit fasthalda einum yvirkapasiteti í framleiðsluni

[12] Av skattskylduga partinum verða goldin 35% í skatti.

á landi. Sum tað framgongur á mynd 2.13, er luturin av útlendskari arbeiðsmegi vaksin nógv í fiskavøruídnaðinum síðan nýggja fast-track skipanin varð sett í gildi. Tað vil siga, at fiskavirkisskipanin, sum helst av fyrstan tíð hevur haft til endamáls at veita arbeiðspláss til føroyingar í avkastgevandi vinnu, nú í staðin í størri og størri mun verður nýtt til at útvega arbeiðspláss til útlendingar.

**Útlendsk arbeiðsmegi býtt á vinnugreinar, jan-01 til jan-24** **Mynd 2.13**




**Viðm.:** Útlendska arbeiðsmegin er roknað sum leypandi 12 mðr. miðal, fólk fødd í Føroyum og aðrir danskir ríkisborgarar blíva bólkað sum føroyingar, meðan øll onnur verða bólkað sum útlendingar.
**Kelda:** Hagstova Føroya og Búskaparráðið**.**

# 3 Almenn nýtsla og íløgur

## Úrslitið á almennu roknskapunum

Mynd 3.1 gevur eitt yvirlit yvir roknskaparúrslit landskassans; RLÚ 1 og úrslitið í prosent av BTÚ. Úrslitið á fíggjarlógini fyri 2024 metir Búskaparráðið verður -146 mió. kr. Metingin tekur støði í fíggjarlógini fyri 2024, sum vísir eitt avlop á góðar 4 mió. kr. (sí tó Boks I). Búskaparráðið metir, at tað burturav støðlingunum[13] av íløgum á 200 mió. kr., sum eru fluttar frá 2023, vera nýttar 100 mió. kr. í 2024 og 50 mió. kr. í 2025. MVG inntøkurnar til landið eru mettar at verða um 50 mió. kr. lægri í 2024, enn mett er á fíggjarlógini fyri 2024 og somuleiðis 50 mió. kr. lægri í 2025. Hetta kemur millum annað av lægri oljuprísi (sum gevur lægri MVG inntøkur). Eisini letur til, at føroyingar aftur eru farnir at ferðast uttanlands, ið merkir, at ein partur av peninginum verður nýttur uttanlands, ístaðin fyri í Føroyum, og tað gevur lægri MVG inntøkur til landið.

Úrslitið í 2025 er mett at gerast -31 mió. kr. Fyri fíggjarárið 2025 hevur Búskaparráðið tikið støði í framskrivingunum hjá Fíggjarmálaráðnum. Hesar framskrivingar taka tó ikki hædd fyri prís- og lønarvøkstri, og tí hevur Búskaparráðið lagt tað afturat. Tað gevur eitt hall á knapt 31 mió. kr. í 2025. Orsøkin til at hallið er minni, enn fyri 2024, er í stóran mun tí landskassans íløgur fella við nærum 200 mió. kr. (tá eru støðlingar á 50 mió. kr. lagdar afturat framskrivaðu íløgunum hjá Fíggjarmálaráðnum).

**Landskassaúrslitið RLÚ, vanligir postar, 1998-2025** **Mynd 3.1**




**Viðm.:** RLÚ í leypandi prísum og sum brøkur av BTÚ í leypandi prísum. RLÚ í 2023 er ikki endaliga uppgjørt, men byggir á bóka roknskapartøl frá 14.02.2024. 2024-2025 eru metingar.

**Kelda:** Gjaldstovan, Fíggjarmálaráðið og Búskaparráðið.

Hyggja vit at 2023, so var saldoin í roknskaparskipan landsins eitt hall á 204 mió. kr. (februar 2024) hjá landskassanum. Alt er tó ikki bókað enn fyri 2023, men Fíggjarmálaráðið væntar at landsroknskapurin kemur at vísa eitt hall á millum 150-160 mió. kr. Tað er lítil ivi um, at hall á fíggjarlógini í 2023, 2024 og 2025 ikki er nóg væl frágingið, tá ið føroyski búskapurin framvegis er í vøkstri við metlágum arbeiðsloysi og inntøkuvøkstri í landskassanum. Hetta bæði sæð í mun til konjunkturstøðuna í løtuni og í mun til veksandi avbjóðingina við haldførinum, tá vit fara at gerast munandi fleiri eldri fólk í mun til tey í arbeiðsførum aldri – í so máta átti tað at verið stór avlop í 2023, 2024 og 2025. Neyðugt er, at landsstýrið ger langtíðarætlanir fyri fíggjarligu gongdina, ikki bara fyri landskassan, men eisini fyri kommunurnar, tí stórar avbjóðingar eru fyri framman, nú ið eldraøkið liggur hjá kommunum. Tað er eyðsæð, at neyðugt verður við fíggjarligum nýskipanum (kapittul 5 viðger hetta evnið).

[13] Støðlingar eru íløgur, sum eru játtaðar í undanfarnu árunum, sum ikki eru framdar enn. Hesar íløgur kunnu koma afturat rakstrinum í sjálvum árinum.

*Boks I Búskapargrunnurin*

Í 2011 kom lógin um búskapargrunnin í gildi. Inntøkur í grunnin eru 20% av yvirskotinum hjá landskassanum (RLÚ 1) upp til 200 mió. kr. og 50% av yvirskotinum omanfyri 200 mió. kr. Harumframt fara inntøkur í grunnin frá millum annað einskiljingum og tilfeingisinntøkum frá fiski- og alivinnuni.

Grunnurin skal virka fyri konjunkturjavning av tilfeingisinntøkunum frá fiski- og alivinnuni. Hetta verður gjørt við at gjalda úr grunninum inn á fíggjarlógina á henda hátt; frá fiskivinnuni eru tað inntøkur upp til 250 mió. kr. sum verða útgoldnar landskassanum sama ár, meðan inntøkur omanfyri 250 mió. kr. árliga skulu javnast yvir 7 ár. Frá alivinnuni eru tað inntøkur upp til 150 mió. kr., sum verða útgoldnar landskassanum sama ár, meðan inntøkur omanfyri 150 mió. kr. árliga skulu javnast yvir 7 ár[14].

Eitt nú var tilfeingisinntøkan frá alivinnuni í 2018 136 mió. kr. Hesar fóru allar beint inn á fíggjarlógina í 2018, tí upphæddin var minni enn 150 mió. kr. Inntøkurnar frá fiskivinnuni vóru hinvegin 303 mió. kr. í 2018, ið merkir, at tær fyrstu 250 mió. kr. fóru beinleiðis inn á fíggjarlógina í 2018 ímeðan restin (303 – 250 = 53 mió. kr.) fóru inn í grunnin. Harumframt varð í 2018 eisini goldið út úr grunninum inn á fíggjarlógina 1/7 av hesum 53 mió. kr. (7,5 mió. kr.), tí hesar 53 mió. kr. verða javnaðar út sum inntøka til landskassan yvir 7 ár.

Tilfeingisinntøkurnar fyri fíggjarlógina 2024 eru mettar at verða 886 mió. kr. og øll hendan upphæddin er skrásett sum inntøka á fíggjarlógina fyri 2024. Tað eru tó bert tær 593 mió. kr. burturav hesum, sum eru tøkar hjá politikarunum at brúka í 2024, tí 293 mió. kr. skulu sambært lógini í búskapargrunnin (886 – 593 = 293 mió. kr.). Hetta er skeivt uppstillað á fíggjarlógini og eigur at vera rættað. Úrslitið á fíggjarlógini fyri 2024 (RLÚ 1) er sambært fíggjarlógini eitt yvirskot á 4 mió. kr. Búskaparráðið metir tó at RLÚ 1 úrslitið fyri 2024 verður -146 mió. kr. Verður hædd eisini tikið fyri, at 293 mió. kr. skulu í búskapargrunnin, er rætta talið eitt hall á 439 mió. kr. (146 – 293 = -439 mió. kr.), sí talvu F2.2 í fylgiskjali 2. Tað er tískil sera ringt hjá bæði politikarunum og borgarum at gjøgnumskoða, hvat veruliga úrslitið á fíggjarlógini er, tá ið upphæddir, ið verða fluttar í búskapargrunn, standa so misvísandi á fíggjarlógini.

Mynd I vísir úrslitið RLÚ I frá mynd 3.1 og RLÚ I, tá ið inntøkurnar frá tøku- og tilfeingisgjøldum, ið skulu í búskapargrunnin og deilast yvir næstu 7 árini, eru frádrignar. Myndin vísir, at munurin verður serliga stórur í 2023 og 2024, ið kemst av hægri tøku- og tilfeingisgjøldum. Í 2023 skulu 147 mió. kr. í búskapargrunnin. Tá hendan upphædd verður drigin frá metingini av úrslitinum fyri 2023, verður hallið 351 mió. kr. Upphæddin sum skal í búskapargrunnin í 2024 er sambært fíggjarlógini 293 mió. kr., tí verður hallið mett til 439 mió. kr.

**RLÚ I og RLÚ I har upphæddin, ið fer í búskapargrunnin er trekt frá, 2018-2024** **Mynd I**




**Viðm.:** RLÚ í 2023 er ikki endaliga uppgjørt, men byggir á bóka roknskapartøl frá 14.02.2024. 2024-2025 eru metingar. Reyðu stabbarnir vísa RLÚ I, tá upphæddin frá tilfeingis- og tøkigjaldinum, sum politikarnir ikki hava at ráða yvir í árinum er frároknaður. Í 2024 er talan um (886 – 593 = 293 mió. kr. sum standa á fíggjarlógini, men sum ikki kunnu nýtast í 2024, tá hesar eru í búskapargrunninum.)

**Kelda:** Gjaldstovan, Fíggjarmálaráðið og Búskaparráðið.

RLÚ er landskassans Rakstrar-, Løgu- og Útlánsúrslit, sum verður býtt sundur í RLÚ 1 (Vanligir postar) og RLÚ 2 (Vanligir og óvanligir postar). Óvanligir postar eru óvanligar inntøkur og útreiðslur, flyting í Búskapargrunn og rentujavningar. Óvanligir postar hava t.d. verið: Í 2007 fekk landsstýrið 1,3 mia. kr. frá sølu av partabrøvum í BankNordik. Í 2008 lænti landsstýrið íslendsku stjórnini 300 mió. kr., sum vórðu afturgoldnar í 2012. Í 2013 inntøkuførdi landsstýrið eginogn Landsbankans (160 mió. kr.) við avtøkuni av bankanum. Í 2018 inntøkuførdi landsstýrið niðurskriving av láni frá danska statinum (500 mió. kr.) sambært avtalu frá 1998. Í 2021 avtók landskassin fíggingargrunnin, sum gav eina inntøku á umleið 60 mió. kr.

[14] Fylgiskjal 2 vísir, hvussu inntøkurnar frá ali- og fiskivinnuni blíva javnaðar, og hvussu nógv skal á fíggjarlógina og hvussu nógv skal í búskapargrunn.

## Nýtslan hjá almennari fyrisiting og tænastu

Mynd 3.2 vísir gongd og vøkstur í nýtsluni hjá almennari fyrisiting og tænastu, sum uppgjørt í tjóðarroknskapinum. Nýtsluútreiðslur hjá almennari fyrisiting og tænastu fevna um nýtsluútreiðslur hjá landi, kommunum, sosialum grunnum og ríki, men ikki fyritøkum undir almennum ræði. Tølini fyri 2023 byggja á bókaði roknskapartøl fram til februar 24, 2024-2025 byggja á metingar[15].

**Almennar nýtsluútreiðslur í mió. kr. og árligur %-vøkstur, 2000-2025** **Mynd 3.2**




**Kelda:** Uppgerð hjá Hagstovu Føroya árini 2000-2022. 2023 er ikki endaliga uppgjørt, men byggir á bókað roknskapartøl frá 14.02.2024. 2024-2025 eru egnar metingar.

Árini 2018 - 2022 veksur almenna nýtslan um 5% árliga, sum er ein stórur vøkstur í hákonjunkturi. Vøksturin verður mettur at vera 5% í 2023, 6% í 2024 og 5% í 2025. Tað eru í størstan mun lønarútreiðslur á vælferðaøkinum, t.d. í heilsu- og almannaverkinum hjá landinum, sum økjast, ið gera seg galdandi fyri árini 2024 – 2025, bæði vegna lønarhækkingar og lønarlyft til summar fakbólkar. Lønargjaldingar eru eisini mettar at økjast hjá kommununum hesi bæði árini, sum millum annað røkja eldraøkið og barnaansing, og somuleiðis veksa útreiðslurnar til fólkapensjónir orsakað av fleiri pensjónistum.

Broytta lógin um javningarprosent til almannaveitingar merkir, at útreiðslurnar til fólkapensjón vaksa í 2024 í mun til 2023, tí fólkapensjónirnar verða javnaðar við prís- og lønarvøkstri. Javningarprosentið verður tó ikki hægri, enn hvat lønarsamráðingarnar náa fram til av lønarvøkstri fyri alment sett starvsfólk. Javningarprosentið er sett til 3,8% í 2024.

## Íløgur almenna geirans

Mynd 3.3 vísir íløguútreiðslurnar, sum eru undir almennum ræði, tað vil siga hjá landi, kommunum, sosialum grunnum og ríki, umframt fyritøkum undir almennum ræði undir einum. Talan er um íløgur samsvarandi tjóðarroknskaparuppgerð og ikki roknskaparuppgerð. Tjóðarroknskaparligu íløgurnar eru størri enn roknskaparligu íløgurnar; m.a. er alt Landsverk og viðlíkahald, herundir keyp av útbúnaði, sum eru rakstrarkostnaðir í landskassaroknskapinum, roknað sum íløgur í tjóðarroknskapinum.

Landið økir sínar íløgur frá 2022 til 2023, tær fella eitt vet í 2024, tí Sandoyartunnilin nú er liðugur, og fella so enn meira í 2025, tá eitt nú landskassin minkar um sínar íløgur við góðum 200 mió. kr. Kommunurnar økja sínar íløgur fitt frá 2022 til 2025.

[15] Tjóðarroknskapurin fyri almenna geiran byggir á almennar roknskapir, m.a. landsroknskapin og kommunuroknskapir og roknskapir fyri summar almennar grunnar og stovnar, sum ikki eru á fíggjarlógini. Bólkingar í hesum roknskapum eru ikki altíð samanfallandi við bólkingar í tjóðarroknskapinum, og eitt ávíst fyrivarni krevst tí í brúki av tølunum.

Íløguútreiðslur hjá fyritøkum undir almennum ræði tvífaldast frá 2023 til 2024. Hesin vøkstur stavar serliga frá øktum íløguvirksemi hjá SEV, Vága floghavn og Atlantic Airways. Íløguútreiðslurnar halda høga støðið í 2025, ið kemst av øktum íløguvirksemi hjá SEV.

**Íløguútreiðslur undir almennum ræði í mió. kr. árini 2003 til 2025** **Mynd 3.3**




**Kelda:** Uppgerð hjá Hagstovu Føroya árini 2003-2022 fyri land og kommunur og íløgur hjá marknaðarframleiðandi fyritøkum undir almennum ræði. 2023 er ikki endaliga uppgjørt, men byggir á bóka roknskapartøl frá 14.02.2024 2024-2025 eru egnar metingar fyri allar almennar íløgur.

Tað er umráðandi, at tað almenna undir einum strembar eftir eini støðugari gongd í almennum íløgum fyri at stabilisera gongdina í búskapinum. Sum myndin vísir, hevur tað ikki gingið væl at halda eina javna íløgugongd. Bæði land og kommunur hava tørv á miðvísari stýring og samskipan av íløgum, eins og tørvur er fyri samskipan av íløguvirksemi hjá fyritøkum undir almennum ræði. Tað hevði verið skynsamt, um politiska skipanin framdi eina ítøkiliga íløguætlan hjá øllum almenna geiranum undir einum. Hetta merkir samstundis, at politiska skipanin má raðfesta millum allar almennu íløgurnar, ið liggja fyri framman. Vaksandi talið av eldri er ein avbjóðing fyri fíggjarpolitiska haldførið í føroyska búskapinum, og neyðugt er at gera nýskipanir. Ein avleiðing av verandi fíggjarpolitikki kann vera, at hettar ættarliðið kemur at binda komandi ættarlið orsakað av manglandi haldføri í fíggjarpolitikkinum og skuld.

# 4 Nettoútflutningur

## Handilsjavni

Mynd 4.1 vísir gongdina í handilsjavnanum sum leypandi 12-mánaðar samanlegging. Handilsjavnin er útflutningurin av vørum minus innflutningin av vørum, við øðrum orðum uttanlandshandil av vørum. Handilsjavnin var 998 mió. kr. í desember 2023, meðan hann uttan skip og flogfør var 2.036 mió. kr.

**Handilsjavnin, jan-94 til des-23** **Mynd 4.1**




**Viðm.:** Leypandi 12-mánaðar samanlegging
**Kelda:** Egnar útrokningar við støði í útflutningstølum hjá Hagstovu Føroya.

Mynd 4.2 vísir, at útflutningurin í 2023 hevur hildið tørn. Í 2023 minkaði útflutningsvirðið nakað av botnfiski og alifiski, meðan økti útflutningurin av svartkjafti sum fiskaúrdráttur vaks munandi um útflutningin í bæði nøgd og virði. Fiskaprísirnir vóru góðir fyrra hálvár í 2023, men vóru fallandi seinna hálvár. Prísirnir á fiskamjøli, fóðri og serliga lýsi, vóru hinvegin høgir alt 2023, og verða væntandi framvegis høgir fyrstu mánaðirnar av 2024.

**Inn- og útflutningur av vørum(uttan skip og flogfør), jan-94 til des-23** **Mynd 4.2**




**Viðm.:** Leypandi 12-mánaðar samanlegging
**Kelda:** Hagstova Føroya

Útlitini fyri útflutningin í 2024 er millum annað merkt av øktari svartkjaftakvotu og høgum laksaprísum. Hinvegin fellur útflutningurin av sild og toski væntandi vegna fallandi kvotu av norðhavssild og av kvotum í Barentshavinum. Størsta broytingin í metingunum fyri 2024 í mun til 2023 er, at útflutningurin av mjøli væntandi fellur, tí makrelur helst í 2024 aftur verður framleiddur til matna, heldur enn at verða landaður sum ídnaðarfiskur. Hetta merkir samstundis, at útflutningurin av lýsi, sum var góð hálv milliard í 2023, fellur munandi.

Á mynd 4.2 sæst, at innflutningurin fall í 2023. Hetta kom serliga av minni innflutningi av brennievni; ikki í nøgdum, men tí oljuprísurin er lækkaður aftur. Innflutningur av 'rávøru til fiskavirking' og alifóðri hava hinvegin togað innflutningsvirðið upp í 2023. Innflutningur av rávøru til fiskavirking er serliga toskur og ídnaðarfiskur.

## Fiskavøruútflutningur

Mynd 4.3 lýsir søguligu gongdina í útflutningsvirðinum av fiskavørum fyri høvuðsbólkarnar alifiskur, uppsjóvarfiskur, botnfiskur og onnur fiskasløg, ið tilsamans so at siga fevna um allan føroyskan vøruútflutning. Alifiskur fevnir um laks og síl, men nærum eingi síl verða útflutt í dag.

Útflutningsvirðið er vaksið nógv á alifiski síðan 2006 og í dag er útflutningurin av alifiski næstan helmingurin av virðinum á fiskavøruútflutninginum. Uppsjóvarfiskur fevnir um makrel, sild og svartkjaft, og harumframt er fiskamjøl og fóður lagt afturat hesum bólki, tá ið serliga svartkjaftur verður útfluttur sum mjøl og fóður heldur enn svartkjaftur til matna. Uppsjóvarfiskur er ein týðandi partur av útflutninginum, og í 2023 var útflutningsvirðið góðar 3. milliardir. Í 2023 var tað serliga útflutningurin av fiskamjøli, sum togaði útflutningsvirðið upp. Botnfiskur fevnir um tosk, hýsu og upsa. Søguliga hevur botnfiskur verið meginparturin av fiskavøruútflutninginum, men útflutningurin hevur verið fallandi og í dag er útflutningsvirðið á uppsjóvarfiski meir enn tvífalt so stórt, og á alilaksi næstan fýra ferðir so stórt. Onnur fiskasløg er ein bólkur av ymiskum fiskasløgum, millum annað rækjur, svartkalvi, gullaksur, longa, brosma, lodna, ídnaðarfiskur og fiskalýsi. Útflutningsvirðið á hesum bólki hevur søguliga verið støðugt, tó er útflutningsvirðið vaksið fitt síðani 2022. Hesin vøkstur stavar serliga frá øktum útflutningi av lodnu og ídnaðarfiski, harumframt var í 2023 útflutt lýsi fyri eitt virði á góða hálva milliard.

**Fiskavøruútflutningur, jan-94 til des-23** **Mynd 4.3**




**Viðm.:** Leypandi 12-mánaðar samanlegging. Botnfiskur er toskur, hýsa og upsi, Alifiskur og laksur og síl, Uppsjóvarfiskur er makrelur, sild og svartkjaftur og fiskamjøl og fóður, og onnur fiskasløg er rækjur, ymisk botnfiskasløg, eitt nú longa og brosma, londa, ídnaðarfiskur og lýsi.
**Kelda:** Hagstova Føroya.

## Laksur

Í 2023 gjørdist tøkunøgdin av laksi minni, enn í 2022. Tað kemur millum annað av, at Bakkafrost tók minni, enn væntað. Tøkan er mett at gerast størri í 2024, enn hon var í 2023, meðan tøkunøgdin í 2025 er verri at spáa um. Smoltgoymslan á landi bendir á, at tøkunøgdin kann gerast størri í 2025, enn í 2024.

**Tøka (livandi vekt) í alivinnuni, 1998 til 2024** **Mynd 4.4**




**Kelda:** Avrik sp/f. 2024 er ein meting

Laksaprísurin var serliga høgur fyrra hálvár 2023 og lækkaði aftur í seinnu helvt av 2023. Mynd 4.5 vísir, at laksaprísurin er á veg upp í løtuni, og er á nærum sama støði, sum sama tíðarskeið í fjør. Sambært metingarstovninum Fishpool, veksur miðal heimsprísurin á laksi væntandi áleið 6% 2024 í mun til miðal prísin í 2023. Altjóða útboðið av alilaksi veksur ikki nevnivert í 2024 og 2025, tí kann væntast at prísurin veksur í 2024 og eisini heldur tørn í 2025, grundin er, at eftirspurningurin eftir laksi veskur skjótari enn útboðið.

**Spotprísur á laksi (DKK/kg) hvørja viku, jan-04 til feb-24** **Mynd 4.5**




**Kelda:** Egnar útrokningar við støði í laksaprísi (í NOK) frá fishpool.eu og gjaldoyrakursi frá Danmarks Nationalbank. Dagført 19.02.2024

# Uppsjóvarfiskur

Endaligu kvoturnar fyri uppsjóvarfisk 2024 eru ikki ásettar enn. Heildarkvotan fyri makrel fall 2% í 2023, og ICES mælir til at lækka heildarkvotuna 5% í 2024. Í 2023 vaks heildarkvotan fyri svartkjaft heili 81%, meðan ICES mælir til at hækka hana 12,5% í 2024. Støðan hjá norðhavssildini er ring, og tískil mælir ICES til at lækka kvotuna við 24%. Kvotan á norðhavssild fall 15% í 2023. Eingin avtala er um uppsjóvarfiskin millum strandalondini, og tað hevur viðført til ovveiðu. Ovveiðan í 2023 av makreli var 47%, av sild 35% og av svartkjafti 34%.

Ovveiðan av makreli hevur higartil borið til, tí tilgongdin av makreli hevur verið góð, men hetta er ikki haldgott í longdini, tí nýggjastu stovnsmetingarnar siga, at stovnsstøddin er niðurgangandi. Heildarkvotan fall eitt vet í fjør, fellur somuleiðis í ár og má væntast at fella eisini næsta ár. Tveir serstakliga stórir árgangir av svartkjafti hava ført við sær, at kvotan vaks við heili 81% í 2023, og at hon eisini veksur við 12,5% í 2024. Í 2025 kann væntast, at heildarkvotan fyri svartkjaft verður áleið óbroytt. Heildarkvotan á norðhavssild fall 15% í 2023 og fellur aftur 24% í 2024 orsakað av vánaligari tilgongd. Støðan hjá norðhavssilduni er somikið ring at heildarkvotan væntandi eisini fellur nógv í 2025.

Árið 2023 var serstakt, av tí at lýsi- og fiskamjølprísir vóru met høgir. Tað førdi við sær, at nógvur makrelur, sum vanliga verður landaður hjá uppsjóvarvirkjunum, ístaðin bleiv landaður sum ídnaðarfiskur til Havsbrún ella uttanlands. Tað vil siga, at útflutningurin av ídnaðarfiski, fiskamjøli og lýsi vaks, meðan útflutningurin av makreli til matna fall eitt vet. Høgi lýsi- og fiskamjølprísurin í 2023 (sí mynd 4.6) skyldast veðurfyribrigdinum El Niño, ið hevði við sær, at Peru, sum er heimsins størsti útflytari av fiskamjøli, onga kvotur hevði, og tí hækkaði heimsprísurin orsakað av minni útboði. Í løtuni er El Niño avtakandi og óvist er, hvussu stóra kvotu Peru og Kili koma at hava í 2024. Væntandi verður prísurin góður fyrra hálvár, men lækkar restina av árinum. Í løtuni væntar vinnan, at makrelurin í 2024 í størri mun aftur verður landaður hjá uppsjóvarvirkjunum, og verður sostatt aftur útfluttur sum makrelur til matna. Harvið fellur útflutningurin av fiskamjøli og lýsi í 2024 í mun til 2023. Stóra svartkjaftakvotan ger hinvegin, at útflutningurin av fiskamjøli framvegis verður størri í 2024 enn í 2022. Av tí at svartkjaftakvotan er so mikið stór, og nøgdin av svartkjafti til matna helst ikki veksur, verður helst nógvur svartkjaftur landaður uttanlands. Í 2023 vórðu 120.000 tons av svartkjafti landaði uttanlands, og væntast kann tað sama í 2024.

**Eindarprísur fyri makrel, sild, fiskamjøl og fóður í útflutninginum, jan-95 til des-23** **Mynd 4.6**




**Viðm.:** Eindarprísurin er roknaður sum leypandi 12-mánaðar miðal. Næstan allur svartkjaftur verður kvørnaður til fiskamjøl.
**Kelda:** Hagtova Føroya.

Mynd 4.6 vísir gongdina í eindarprísunum fyri makrel, sild, umframt fiskamjøl og fóður. Myndin vísir, at prísurin á sild var góður í 2023, og væntast kann, at prísurin veksur í 2024, tí at nøgdin av norðhavssild minkar. Høgi prísurin á lýsi helt støðið undir landingarprísinum á makreli í 2023. Í 2024 væntast makrelurin at verða landaður til uppsjóvarvirkini aftur, og prísurin væntast at halda sær í 2024.

## Botnfiskur

Fiskiskapurin eftir toski, hýsu og upsa á landgrunninum verður skipaður við fiskidøgum, umframt øðrum átøkum. Bólkur 2 (lemma- og partrolarar) verður skipaður fyri seg, serliga grundað á stovnsmetingarnar fyri upsa, meðan bólkur 3-5 (lína, snella og trolbátar) verða skipaðir saman, grundað á stovnsmetingar fyri tosk og hýsu. Onnur botnfiskasløg undir Føroyum, eitt nú longa, brosma og svartkalvi verða ikki stýrd eftir nakrari skipan.

**Toskur í føroyskum havøki: samlaður stovnur, veiða og veiðitrýst, 1959-2026** **Mynd 4.7**




**Viðm.:** Fyri 2024 - 2026 er talan um metingar hjá ICES og Havstovuni.
**Kelda:** ICES, Havstovan og egnar útrokningar.

Gongdin í fiskiskapinum av høvuðsbotnfiskasløgunum toski, hýsu og upsa undir Føroyum hevur verið niðurgangandi í fleiri ár. Toskastovnurin á landgrunninum er sera illa fyri (sí mynd 4.7). Stovnurin hevur verið undir søguligum lágmarki síðan 2004, undantikið 2018. Av tí at toskastovnurin er undir lívfrøðiliga vandamarkinum ( $B_{lim}$ ), mælir Havstovan til, at hugt verður burturfrá umsitingarætlanini og at fiskidagarnir hjá Bólki 3-5 verða skerdir 20%, hóast hýsustovnurin er í vøkstri.

Veiðan av upsa hevur verið undir søguliga miðal síðan 2010. Havstovan metir, at upsastovnurin er toluliga væl fyri. Havstovan mælir til, at fiskidagarnir til Bólk 2 verða skerdir 10%, av tí at hesin bólkur fiskar tosk sum hjáveiðu, og toskastovnurin er avbera illa fyri. Umframt at veiðan av toski undir Føroyum væntandi fellur í 2024, fellur kvotan í Barentshavinum eisini. Ein lækking í kvotuni í Barentshavinum er eisini í væntu í 2025. Sostatt verður mett, at útflutningurin av toski í nøgd fellur komandi tvey árini.

Mynd 4.8 vísir, at eindarprísurin fyri botnfisk hækkaði serstakliga nógv í 2022. Prísurin á toski var góður í fyrra hálvári 2023 og lækkaði í seinnu helvt av 2023. Líkt er til, at prísurin á toski heldur sær á einum høgum støði og møguliga kvinkar upp, tí at útboðið av toski fellur í 2024 og 2025, vegna fallandi kvotu í Barentshavinum. Hýsuprísurin fall í 2023, men heldur væntandi ikki áfram at fella í 2024. Útlit eru fyri at prísurin á hýsu verður meira støðugur í 2024 og 2025. Prísurin á upsa hevur verið serstakliga høgur í 2022 og 2023, men prísurin byrjaði at fella aftur í seinnu helvt av 2023. Av tí at vinnan boðar frá, at marknaðurin er rættiliga trupul í løtuni, fellur prísurin eitt vet í metingunum fyri 2024.

Søguliga hevur veiðan eftir botnfiski (toski, hýsu og upsa), frá einum búskaparligum sjónarhorni, verið meira lønandi enn uppsjóvarfiskarí. Tað kemst av góðum fiskileiðum undir Føroyum, og at fiskaprísurin av hesum fiskasløgum søguliga hevur verið áleið dupult so høgur sum á uppsjóvarfiski. Høgir prísir í byrjanini av øldini og ikki nøktandi umsiting av botnfiskastovnunum í mun til mest loyvda veiðu (TAC), hava ført við sær fallandi gýtingarstovnar. Kapasiteturin hjá heimaflotanum, tað er talið av fiskiførum, er fallin ov seint seinastu 20 árini, fyri at forða fyri skrædli hjá botnfiskastovnunum. Búskaparligu avrikini

hjá heimaflotanum hava í síni heild verið ónøktandi og niðurgangandi síðani 2000. Tí sæst millum annað, at miðalaldurin á skipunum í bólki 3-5 er hægri enn hjá nótaskipum og flakatrolarum[16].

**Eindarprísur fyri botnfisk í útflutninginum, jan-95 til des-23** **Mynd 4.8**




**Viðm.:** Eindarprísurin er roknaður sum leypandi 12 mðr. miðal.

**Kelda:** Hagstova Føroya.

Heimaflotin er komin til eitt markamót, og neyðugt er at gera eina haldgóða ætlan fyri, hvussu heimaflotin gerst burðardyggur, so hann gevur íkast til búskapin. Serliga toska- og hýsustovnarnir undir Føroyum eru staðbundnir stovnar, og tað sum hvørt ár verður tikið úr stovnunum, hevur sjálvsagt ávirkan á støddina á stovnunum. Tí hevur veiðitrýstið týdning fyri støddina á tí varandi ískoyti, sum fiskastovnarnir kunnu geva føroyska búskapinum. Endamálið við at avmarka veiðitrýstið er fyrst og fremst, at fiskastovnarnir skulu geva størst møguligt búskaparligt avkast til samfelagið í langa høpinum. Á mynd 4.7 sæst, at søguliga hevur veiðan av toski í miðal verið áleið 25.000 tons. Vánalig umsiting av toskastovninum, kann verða grundin til, at toskastovnurin er søguliga lítil, og at veiðan av toski undir Føroyum seinastu árini bert hevur ligið um 5.000 tons. Við øðrum orðum fara stór samfelagslig virðir fyri skeytið á hvørjum ári, møguliga orsakað av óskynsamari umsiting.

Stóra talið av óbrúktum fiskidøgum, er eitt tekin um, at skip ikki mangla fiskidagar, og at tað so at siga altíð er møguleiki fyri at fara út at fiska meira. Tí kann skipanin sum botnfiskaflotin verður stýrdur við, verða lýst sum frítt fiskarí, ið hvørki er skilagott lívfrøðiliga ella búskaparliga. Tað kann vera torført at gera eina eintýdda niðurstøðu um, hví støðan hjá eitt nú toskinum er so ring. Fleiri lívfrøðiligar grundir kunnu vera til hetta, men eisini kann ovurfiskarí verða grundin. Lívfrøðiligu umstøðurnar kunnu vit ikki beinleiðis stýra, men hvussu nógvur fiskur verður tikin úr stovninum á hvørjum ári, kann og eigur at verða stýrt. Búskaparráðið metir tað vera meira skynsamt at hava kvotur, heldur enn fiskidagar, so mark kann setast fyri nøgdina, ið verður fiskað. Sum tað minst, eigur eitt hámark fyri veiðuna at verða ásett, eitt sokallað TAC (total allowable catch), fyri at tryggja at lívfrøðilig hámark vera hildin.

Vánaliga støðan í heimaflotanum við ringu útlitunum frameftir, hevur harafturat fingið politisku skipanina til at fara inn aftur á gamlar slóðir, ið vit frá royndum vita ikki er haldbart, við at veita stuðul til heimaflotan. Stuðulin verður ikki veittur sum reiður peningur, men tað kundi hann tað sama verið. Skipini, og í einkultum førum eisini fiskavirkir, fáa útlutað makrelkvotur, sum tey ikki eru før fyri, ella hvørt tað ikki loysir seg at fiska makrel. Síðan selja hesi kvoturnar til onnur at fiska. Heldur enn at leggja dent á at umsita fiskatilfeingið burðardygt og effektivt, hevur politiska skipanin valt at veita stuðul sum makrelkvotur til skip, ið ikki eru útgjørd at fiska makrel. Stuðulin skeiklar natúrligu tillagingina hjá botnfiskaflotanum, og hevur við sær at ein yvirkapasitetur framhaldandi er, sum stuðlar undir yvirfiskarí. Fiskidagaskipanin er soleiðis hátta, at fyri at kunna selja víðari er brúksskyldan 60%. Um fiskifarið ikki

[16] Faroe Islands Fisheries in the Northeast Atlantic: Brexit, Russia and economic incoherence (2024), Ellefsen, H. og Bromley, D. W.

brúkar 60% av veiðrættindunum, so kann reiðaríið ikki avhenda fiskirættindi árið eftir. Tí eggjar skipanin til at fiskað verður upp til 60% av fiskidøgunum, tí annars missa fiskidagarnir hjá reiðaranum virðið. Verður so eisini tikið hædd fyri stuðulin, so skal tann vinnurekandi ikki einans taka støðu til, um tað loysir seg at fara út at fiska ein dag meira ella ikki, men skal eisini taka við í sítt grundarlag eina mista stuðulsinntøku frá makrelinum. Hetta førir til eina skipan, sum eggjar óeffektivum skipum, at fara út at fiska ístaðin fyri at liggja við kai. Ein ósunn ringrás, sum í ringasta føri kann føra til skrædl av bæði fiskastovnum og heimaflotanum.

Minstalønin til fiskimenn og ásetingin um brúksskyldu ger, at hóast fiskiskapurin ikki ber seg, verður kortini fiskað. Skipannin við minstuløn til fiskimenn tryggjar manningini eina minstuløn, óansæð hvussu fiskiskapurin er. Tá stovnarnir minka, ger skipanin, at fiskiskapurin heldur fram, og stovnarnir verða fiskaðir enn longur niður. Skipanin forðar eisini arbeiðsmegini í at flyta yvir í aðrar vinnur, har hon kundi givið eitt íkast til búskapin. Møguleikin at fáa útlendska manning til fiskiskip, sum fiska so lítið, at manningin er á minstuløn meginpartin av árinum, ger harumframt, at vit fáa arbeiðsmegi til fyritøkur, sum ikki klára at geva kappingarførar hýrur til føroyska manning. Sostatt førir hendan skipanin eisini til, at fyritøkur, sum annars møguliga høvdu lagt skipini, tí tey ikki klára at manna tey, nú fáa manna tey við útlendingum, og sostatt heldur lív í einum yvirkapasiteti í veiðiliðinum. Niðurstøðan er, at slíkar stuðulsskipanirnar føra til stórar skeiklingar har ov nógv skip eru til ov lítið av fiski, soleiðis at produktiviteturin í veiðuni verður hildin niðri á einum sera lágum støði.

Búskaparráðið talar fyri, at tilfeingisgjald verður tikið inn fyri tey náttúrutilfeingi, sum Føroyar ráða yvir. Verður tilfeingisgjald ikki tikið inn av tilfeingisrentuni, verður trýstið fyri at sleppa framat at fáa part í veiðirættindum sera stórt, tá raksturin hjá verandi fyritøkum gongur væl, og vandin er tí stórur fyri at fáa yvirkapasitet, har tilfeingisrentan verður til rakstrarkostnað og fiskivinnan lítið produktiv. Hetta er millum annað tað, vit síggja í heimaflotanum. Tað er breið semja um, at har sum tilfeingisrenta, vegna framíhjárættindini, er í vinnuni, er tað rímiligt at goldið verður fyri henda framíhjárætt. Endamálið við hesum politikki eigur at vera at fáa sum mest burturúr búskaparliga í longdini. Harundir er endamálið eisini at optimera tilfeingisrentuna á teimum náttúrutilfeingjum, sum Føroyar ráða yvir, og at optimera føroyska framleiðslu og produktivitetsvøkstur í øllum búskapinum. Ein politikkur, sum byggir á hesar fortreytir, kann og eigur at verða hildin í longdini, og eigur ikki at skifta eftir fíggingartørvi hjá landskassanum.

# 5 Fíggjarpolitiskt regluverk og langtíðarhaldføri

Gongdin í almennu nýtsluni og íløgunum hevur tey seinastu nógvu árini verið konjunkturviðgangandi. Tá ið inntøkurnar hava verið stórar, hevur nógv verið brúkt og øvugt. Royndirnar vísa sostatt, at tað er torført hjá politisku skipanini at standa ímóti og ikki at økja um nýtsluna í góðum tíðum. Førdi fíggjarpolitikkurin hevur tískil økt um trýstið á búskapin tey góðu árini. Tá ið alt avlopið verður brúkt í góðum tíðum, verður oftani spart, tá ið búskapurin er í afturgongd, og harvið verða ringar tíðir gjørdar verri, enn neyðugt.

Í mynd 5.1 sæst, at íløgurnar eru øktar í góðum tíðum meðan tað í lágkonjunkturi verða framdar færri íløgur (kapitalútreiðslur eru útreiðslur til íløgur). Posturin 'búskaparviðurskifti' í mynd 5.1 er størsti bólkurin; hann fevnir um alt, ið hevur við undirstøðukervið at gera, tað vil siga bæði sjóvegis og á landi. Sveiggini í hesum posti koma serliga av teimum fýra undirsjóvartunlunum[17].

**Kapitalútreiðslur sum prosent av BTÚ frá 1998 til 2022** **Mynd 5.1**




**Kelda:** Hagstova Føroya og Búskaparráðið

Í mynd 5.2 sæst, at almennu rakstrarútreiðslurnar eru fylgdar við búskaparvøkstrinum, so hvørt sum hann er øktur (svarta strikan). Rakstrarútreiðslurnar hava sostatt áleið tað sama lutfallið av BTÚ øll árini, sama hvussu nógv búskaparvøksturin hevur verið (litaða økið). Hetta vísir, at tað hevur verið ov torført hjá politisku skipanini ikki at økja almennu útreiðslurnar, tá ið almennu inntøkurnar eru øktar. Førdi fíggjarpolitikkurin hevur sostatt økt, heldur enn at minka um sveiggini í búskapinum.

Búskaparráðið mælir tí politisku skipanini til at seta í verk eitt fíggjarpolitiskt regluverk, sum setir eitt hámark fyri, hvussu nógv almennu rakstrarútreiðslurnar kunnu veksa árliga, soleiðis at útreiðsluvøksturin ikki av sær sjálvum fylgir inntøkuvøkstrinum[18]. Afturat einum rakstrarútreiðsluhámarki er skynsamt at gera eina framskriving av almennu inntøkunum og útreiðslunum, so hvørt sum politisk tiltøk verða skotin upp, eitt nú 10 og 20 ár fram, so tað verður avdúkað, um inntøkurnar og útreiðslurnar javnviga í framtíðini. Ein framskriving vísir, hvussu stórur tørvurin er á at gera nýskipanir og sparingar. Hevur eitt hvørt politiskt uppskot við sær, at inntøkurnar ikki javnviga við útreiðslunum í framtíðini, skal uppskotsstillarin svara fyri, hvussu hann ætlar at fáa javnvág aftur millum inntøkurnar og útreiðslurnar.

---

[17] Í 2022 flutti Hagstova Føroya undirsjóvartunlar úr S11 (Ikki-fíggjarlig feløg) til S13 (Almenn fyrisiting og tænastu) í tjóðarroknskapinum; hetta fyri at uppgerðin skal fylgja altjóða leiðreglum fyri tjóðarroknskap. Hetta varð gjørt við afturvirkandi kraft, og merkir, at allar íløgur í undirsjóvartunlar í dag eru uppgjørdar sum almennar íløgur.
[18] Sí eisini https://www.landsbankin.fo/fo-fo/kunning/soeguligt-tilfar Fíggjarpolitiskt regluverk. Stutt lýsing. 2010.

Føroyski búskapurin er lítil og opin, og viðbrekin yvirfyri stoytum, ið koma uttanífrá. Í Føroyum innflyta vit nærum alt, sum vit nýta, og útflyta nærum alt, sum vit framleiða. Av tí at vinnulívið í Føroyum byggir á sera fáar vinnugreinar, kunnu inntøkurnar hjá landskassanum sveiggja nógv. Tí er umráðandi, at útreiðsluvøksturin ikki fylgir inntøkuvøkstrinum, men at eitt hámark verður sett fyri, hvussu nógv rakstrarútreiðslurnar kunnu veksa, soleiðis at tað er møguleiki fyri at føra fíggjarpolitikk og tálma stutttíðarsveiggjum í búskapinum. Um hámark er fyri útreiðsluvøkstrinum tey árini búskaparvøksturin er stórur, førir tað til alvop, og so er ikki neyðugt at skerja útreiðslurnar, tá tey ringu árini koma.

**Rakstrarútreiðslur sum prosent av BTÚ og upphædd frá 1998 til 2022** **Mynd 5.2**




**Kelda:** Hagstova Føroya og Búskaparráðið

Mynd 5.3 vísir, at tað flutti ein stórur hópur av føroyingum av landinum í 90'unum. Føroyar hevði eina stóra skuld og eitt sera vánaligt kredittvirði fyrst í 90'unum, og danski staturin noyddist at yvirtaka skuldina. Er skuldin høg, er ikki frælsi til at føra fíggjarpolitikk[19].

**Nettotilflyting, tal av persónum, 1985 til des-2023** **Mynd 5.3**




**Viðm.:** 12 mánaðar leypandi samanlegging.

**Kelda:** Hagstova Føroya.

Almenna hallið var stórt og inntøkurnar minkaðu, og tí kundi politiska skipanin ikki føra stimbrandi fíggjarpolitikk, men var hinvegin tvungin at minka um almennu nýtsluna. Avleiðingin var stór búskaparlig

[19] Umframt at rentuváðin er hægri, tá ið skuldin er høg.

afturgongd og stór fólkafráflyting; í árunum 1990 – 1995 flutti umleið 15% av fólkinum av landinum. Undir fíggjarkreppuni í 2008 var støðan frægari; almenna skuldin var lág og kreditvirðið hampiligt (sí mynd 3.2), og tí bar til hjá landinum at taka lán, so landið slapp undan at minka um almennu nýtsluna í árunum eftir 2008. Av tí sama var búskaparliga afturgongdin ikki merkisverd, og fólkafráflytingin ikki nær námind so stór, sum í 90'unum[20].

Eitt fíggjarpolitiskt regluverk kann tryggja tamarhald á útreiðsluvøkstrinum, soleiðis at tað er gjørligt at miða eftir at fáa javnvág ímillum útreiðslur og inntøkur uppá longri sikt (sí frágreiðing um ymsu amboðini í Boks II). Sum nú er, er ikki haldføri í førda fíggjarpolitikkinum, tí tað er ikki javnvág millum útreiðslurnar og inntøkurnar í framtíðini. Nýggja haldførisútrokningin[21] hjá Búskaparráðnum vísir, at fíggjarpolitikkurin ikki er haldførur. Ávísin fyri fíggjarpolitiska haldførið er -9% av BTÚ, ið gevur eitt fíggjarkrav á áleið 2 mia. kr. í mun til BTÚ i 2022 um eingin átøk verða framd fyri at bøta um fíggjarpolitiska haldførið. Hetta kemur av, at tað í framtíðini ikki verður sama lutfall sum í dag millum talið av forsyrgjarum og teimum, ið skulu forsyrgjast.

Meginparturin av okkara vælferðarsamfelagi er fíggjað av skattum og gjøldum, sum fólk í arbeiðsførum aldri gjalda, meðan eldri fólk, ið eru farin á pensjón, fáa fólkapensjón, eldrarøkt og heilsutænastur. Í árunum fram til 2020 hevur verið ein tilgongd av fólki omanfyri 80 ár á umleið 40 fólk árliga í miðal, meðan tað í árunum frá 2020 heilt fram til 2050 fara árliga at leggjast umleið 100 fólk yvir 80 ár afturat verandi skara av fólki omanfyri 80 ár, sí mynd 5.4.

**Árlig nettotilgongd av 80+ ára gomlum** **Mynd 5.4**




**Viðm.:** Tal av fólki árliga (miðal yvir 5 ár).
**Kelda:** Hagstova Føroya og egnar útrokningar.

Hetta fer at seta eitt stórt trýst á almennu rakstrarútreiðslurnar, tí tað eru serliga vælferðartænasturnar til fólk omanfyri 80 ár, sum eru kostnaðarmiklar fyri samfelagið. Sambært meting hjá Landsbankanum fara eldraútreiðslurnar hjá landskassanum og kommununum við verandi prísum at veksa við 65 mió. kr. árliga næstu 12 árini ella við 800 mió. kr. tilsamans fram til 2035. Hetta merkir, at landskassin og kommunurnar tilsamans fara at fáa stór hall um fá ár, og tí er stórur tørvur á at fáa eitt fíggjarpolitiskt regluverk sett í verk, umframt at fremja nýskipanir.

Øll viðurskifti, ið lækka almennu útreiðslurnar ella hækka inntøkurnar, bøta um fíggjarpolitiska haldførið. At hækka pensjónsaldurin betrar um haldførið, bæði tí pensjónsútreiðslurnar hjá landskassanum minka, og tí almennu inntøkurnar hækka av, at fólk halda fram á arbeiðsmarknaðinum. Í núverandi lóggávu er

[20] Ein partur av fráflytingini stavaði frá stórari tilgongd av ungum fólki til arbeiðsmarknaðin í hesum árunum, sum føroyski arbeiðsmarknaðurin ikki megnaði at taka ímóti.
[21] Sí temafrágreiðing Búskaparráðsins um fíggjarpolitiskt haldføri frá januar 2024.

bert samtykt at hækka pensjónsaldurin við einum hálvum ári í 2025 og 2030[22], men tað røkkur ikki til at loysa haldførisavbjóðingina, sí mynd 5.5a og b. Í myndini sæst, at almennu útreiðslurnar framhaldandi veksa frá almennu inntøkunum, ið gevur eitt vaksandi hall hjá almenna geiranum.

**Pensjónsaldurin hækkar við einum hálvum ári í 2025 og 2030**

**Inntøkur og útreiðslur almenna geirans** — **Mynd 5.5a** | **Úrslit á primeru saldo** — **Mynd 5.5b**




**Kelda:** Búskaparráðið

Fyri at fáa haldføri í fíggjarpolitikkin, mælir Búskaparráðið tí til at hækka pensjónsaldurin við einum heilum ári fimta hvørt ár við byrjan í 2035. Verður hetta framt, gerst føroysku fíggjarpolitikkurin haldførur í langa høpinum, og almenni geirin fær árlig hall í einum avmarkaðum tíðarskeiði, ið minka so hvørt, sum pensjónsaldurin hækkar, sí mynd 5.6a og b.

**Pensjónsaldurin hækkar við einum ári fimta hvørt ár (frá 2035)**

**Inntøkur og útreiðslur almenna geirans** — **Mynd 5.6a** | **Úrslit á primeru saldo** — **Mynd 5.6b**




**Kelda:** Búskaparráðið

Síðani pensjónsskipanin varð yvirtikin í 1988, er miðal livitíðin hjá pensjónistum økt við 4 árum og er hon í dag 19 ár uttan at pensjónsaldurin er øktur tilsvarandi. Tað er tískil, longu sum nú er, vorðið tyngri hjá arbeiðsfjøldini at fíggja útreiðslurnar til vælferðartænasturnar. Hækkar pensjónsaldurin ikki so hvørt sum

[22] Hækkan av pensjónsaldrinum skal samtykkjast 10 ár frammanundan, tað vil siga, at skal pensjónsaldurin hækka í 2035, skal hetta samtykkjast áðrenn 2025.

liviárini gerast fleiri, fer tað at føra til størri ójavnvág í lutfallinum millum hækkandi útreiðslur til pensjón og relativt færri skattainntøkur frá arbeiðsinntøkum í arbeiðslívinum. Neyðugt er tí at stilla pensjónsaldurin, so økti livialdurin ikki einans fer til fleiri ár á pensjón, men eisini til fleiri virkin ár á arbeiðsmarknaðinum.

Verða átøk ikki framd, fer almenni geirin sum frálíður at fáa eitt áhaldandi og veksandi hall, og fíggingartørvurin fer komandi 40 árini at svara til 45 mia. kr. tilsamans. Verður pensjónsaldurin hinvegin øktur við einum ári fimta hvørt ár við byrjan í 2035, minkar fíggingartørvurin niður í 12 mia. kr. komandi 40 árini. Tó verður fíggingartørvurin heilt lítil longu eftir 2055. Tey fyrstu 10 árini (2025 – 2035) verður fíggingartørvurin hjá almenna geiranum góðar 2,5 mia. kr. ella 250 mió. kr. árliga, sum svara til nærum 1% av BTÚ árliga í 2024-prísum. Fíggingartørvurin verður størri tey eftirfylgjandi 10 árini (2035 – 2045); tá verður hann nærum 6 mia. kr. ella 600 mió. kr. árliga (góð 2% av BTÚ í 2024). Í árunum 2045 – 2055 verður hann nærum 4 mia. kr. ella 400 mió. kr. árliga, sum svarar til nærum 1,5% av BTÚ í 2024. Eftir 2055 verður fíggingartørvurin av lítlum týdningi, (0,1% av BTÚ), men tey komandi 3 áratíggjuni verður hinvegin neyðugt, at politiska skipanin, umframt at hækka pensjónsaldurin við einum ári fimta hvørt ár, fremur nýskipanir og ger átøk, sum økja um inntøkurnar og minka um útreiðslur í almenna geiranum, fyri at almenna skuldin ikki áhaldandi skal veksa.

Búskaparráðið mælir tí politisku skipanini til at seta í verk eitt fíggjarpolitiskt regluverk fyri land og kommunur undir einum, soleiðis at tamarhald fæst á útreiðsluvøkstrinum, so tað ber til at miða eftir fíggjarpolitiskum haldføri; tað vil siga at fáa javnvág millum útreiðslur og inntøkur í langa høpinum. At hava eitt hámark fyri, hvussu nógv almennu rakstrarútreiðslurnar kunnu veksa, lættir um trýstið á politikararnar at økja um almennu nýtsluna og íløgurnar, tá ið tað gongur væl í búskapinum, og økir harafturat um kredittvirðið hjá landinum, tí regluverkið ger politisku skipanina betri føra fyri at halda rakstrarútreiðsluvøksturin undir einum hámarki.

Búskaparráðið mælir politisku skipanini til í eini breiðari semju at seta sær mál fyri úrslitið hjá almenna geiranum 10 ár fram í tíð, sum er í samsvar við ein haldføran búskap í langa høpinum, tað vil siga hjá landi og kommunum undir einum. Politiska skipanin kann eitt nú seta sær fyri, at almennu útreiðslurnar og inntøkurnar skulu javnviga í 2035. Tá tað er gjørt, skal metast um, hvat væntaðu almennu inntøkurnar verða fram til 2035, og hvørt hesar inntøkur røkka til at fíggja væntaðu almennu útreiðslurnar. Tá ið inntøkurnar verða mettar fram í tíð, verða fyribils konjunktursveiggj sáldaði frá, og harafturat verða útreiðslur til óvæntaðar hendingar hildnar uttanfyri útreiðslurnar, eitt nú hendingar sum Covid-19. Slíkar hendingar, sum knappliga økja almennar útreiðslur munandi, skulu ikki elva til sparingar, men kunnu fíggjast við lántøku.

Vísa metingarnar í roynd og veru, at útreiðslurnar til eitt nú vælferðarøkið, vegna veksandi talið av eldri fólki, fara at taka ein ov stóran part av væntaðu inntøkunum, noyðast nýskipanir at verða framdar. Er ikki ynski um at fremja nýskipanir, er neyðugt at politiska skipanin greiðir frá, hvussu nógv ávísar almennar tænastur og veitingar skulu skerjast, ella hvussu nógv skatturin skal hækka, fyri at røkka málinum um javnvág millum inntøkur og útreiðslur í 2035. Eftirfylgjandi samráðast land og kommunur um ein útreiðslukarm, ið fevnir um eitt styttri tíðarskeið, til dømis 4 ár. Útreiðslukarmurin liggur fastur, men kommunurnar kunnu frítt raðfesta innanfyri karmin, sum teimum lystir. Karmurin skal vera treytaður av, at málið um javnvág í 2035, verður rokkið[23].

## Fólkafráflyting

Í kanningini av fíggjarpolitiska haldførinum mælti Búskaparráðið til at hækka pensjónsaldurin, effektivisera raksturin í almenna geiranum og gera eitt fíggjarpolitiskt regluverk. Harumframt mælti Búskaparráðið til, at politiska skipanin fremur átøk, sum minka um fráflytingina, serliga av ungum fólki, úr Føroyum.

Síðani áleið 2014 hevur tað bæði verið tilflyting av donskum og ikki donskum ríkisborgarum til Føroya. Danskir ríkisborgarar eru einamest føroyingar, sum flyta heimaftur, og ikki danskir ríkisborgarar eru

[23] Sí eisini boks III um danska fíggjarpolitiska regluverkið

útlendingar (fyriuttan danir). Tað er bert eitt tíðarskeið, har tilflytingin av føroyingum var á sama lága støði sum í dag, og tað var í kreppuárunum 1990 - 1993. Síðani 2022 hevur nettotilflytingin av útlendingum verið positiv, ímeðan tað hevur verið ein nettofráflyting av føroyingum. Tað eru sostatt útlendingar og ikki føroyingar, sum eru orsøk til positivu nettotilflytningina til Føroya eftir 2022, sí mynd 5.7.

**Nettotilflyting býtt á danskar og ikki danskar ríkisborgarar** **Mynd 5.7**




**Kelda:** Hagstova Føroya og egnar útrokningar

Tilflytingin av føroyingum hevur í árunum 2014 – 2021 verið áleið 1.200-1.400 í tali, meðan tað í 2022 og 2023 einans var 950. Hví tilflytingin av føroyingum er fallin seinastu tvey árini, er ilt at meta um, og orsøkirnar kunnu vera fleiri. Ein orsøk kann verða mangul á leigu- og eigarabústøðum í Føroyum. Harafturat er gáttin at koma inn á bústaðarmarknaðin fyri fyrstuferðskeyparar vorðin hægri seinastu árini. Tað stavar frá øktum sethúsaprísum og síðani 2022 eisini rentuhækkingum og prísvøkstri, sum hava elvt til herd krøv til tiltøkupening frá bankunum. Ein onnur orsøk kann vera, at tað í summum kommunum er trupult at fáa børnini á stovn.

Harumframt kann eitt møguligt ósamsvar millum útbúgving, førleikar og føroyska arbeiðsmarknaðin, verða ein orsøk. Arbeiðsloysið í Føroyum er sera lágt, og trot hevur verið á arbeiðsmegi innan fleiri vinnugreinar, tó verður oftast talað um mangul á ófaklærdari arbeiðsmegi. Føroyingar, ið flyta heimaftur, hava sum oftast eina miðallanga ella langa útbúgving. Spurnartekin kann setast við, um føroyski arbeiðsmarknaðurin er nóg dugnaligur til at skapa størv til hendan málbólkin, og um fólk velja at vera verandi í útlondum, um fleiri starvsmøguleikar eru har.

*Boks II Stýringsamboð til fíggjarpolitiskt regluverk*

Eitt fíggjarpolitiskt regluverk hevur fleiri stýringsamboð, men ikki øll stýringsamboðini eru líka væl egnaði til føroyska búskapin. Ein kann millum annað stýra eftir úrsliti, skuldarhámarki ella rakstrarútreiðsluhámarki:

At stýra eftir *úrsliti* meinast við, at tað verður sett eitt hámark fyri landskassans hall, ella at hall á fíggjarlógini skulu vendast til avlop innan nøkur heilt fá ár. Kemur búskapurin í afturgongd og inntøkurnar hjá landskassanum svíkja, er tað tó ikki skynsamt at tátta í fyri at fáa javnvág í almenna úrslitið ella fyri at halda hallið undir einum avísum hámarki, eins og royndirnar frá 90'unum vísa. Um búskapurin er í framgongd við veksandi almennum inntøkum, er heldur ikki skynsamt at stýra eftir úrslitinum, tí tað merkir, at politiska skipanin frítt kann nýta upp til hámarkið, ístaðin fyri at leggja til síðis til verri tíðir.

At stýra eftir *skuldarhámarki* merkir, at ásett verður eitt hámark fyri skuld hjá almenna geiranum sum prosent av BTÚ. Tað er tó ivasamt, um tað er skynsamt at stýra eftir skuldarhámarki, tí um skuldarhámarkið longu er rokkið, tá ringar tíðir koma, so noyðist politiski myndugleikin at skerja almennu nýtsluna í teprum tíðum og harvið gera búskaparafturgongdina enn verri. Um skuldarhámarkið skal nýtast sum stýringsamboð, so er neyðugt, at politisku myndugleikarnir halda skuldina væl niðanfyri hámarkið í vanligum tíðum.

At stýra eftir *rakstrarútreiðsluhámarki* verður hinvegin viðmælt. Tá verður stýrt eftir einum hámarki fyri, hvussu nógv prosent almennu rakstrarútreiðslurnar kunnu veksa um árið. At hava eitt hámark fyri, hvussu nógv almennu rakstrarútreiðslurnar kunnu veksa, lættir um trýstið á politikararnar at økja um almennu nýtsluna og íløgurnar, tá ið tað gongur væl í búskapinum. Umráðandi er, at rakstrarútreiðsluhámarkið verður sett øllum almenna geiranum undir einum, tað vil siga ikki bert fyri landskassan, men fyri landið og kommunurnar undir einum.

*Boks III Fíggarpolitiska regluverkið í Danmark*

Í Danmark verður í breiðari politiskari semju ásett eitt mark 10 ár fram í tíð, fyri hvussu stórt hallið kann vera á strukturella javnanum hjá almenna geiranum[24]. Síðani hava danir eitt fíggjarpolitiskt regluverk (á donskum Budgetloven) um hámark fyri útreiðsluvøksturin, sum fevnir um land og kommunur.

Danmark hevur sett sær fyri at røkka einum máli um hall á strukturella javnanum á í mesta lagið 0,5% av BTÚ í árunum 2030 – 2055[25].

Orsøkin til, at munur verður gjørdur á strukturellum javna og veruligum javna er, at loyva vøkstri í útreiðslum til konjunkturtreytaðar almennar tænastur og veitingar. Á strukturella javnanum eru konjunktursveiggj frároknaði. Tað merkir, at øktar útreiðslur í niðurgangstíðum, vegna eitt nú veksandi arbeiðsloysi, ikki elvir til krøv um sparingar í almennu nýtsluni. Hallini á veruliga javnanum kunnu tí vera størri enn hallini á strukturella javnanum. Hall á veruliga javnanum eru loyvd at vera upp til 3% av BTÚ árliga sambært ES-lóggávu.

Harafturat er tað í danska fíggjarpolitiska regluverkinum ásett, at eitt ovara mark fyri almennu útreiðslurnar skal samtykkjast fyri eitt 1-ára tíðarskeið. Hetta fevnir um land og kommunur undir einum, og fíggjarætlanirnar verða lagdar til rættis innan fyri hetta ovara markið. Í danska regluverkinum eru revsitiltøk móti kommunum og regiónum, um tær í einstøkum fíggjarárum ikki yvirhalda avtaluna við donsku stjórnina um markið fyri almennu útreiðslurnar. Danir samtyktu hetta fíggjarpolitiska regluverkið í 2012, sum eitt átak ímóti áhaldandi ovurnýtslu í almenna geiranum, og tí kommunurnar og regiónirnar høvdu ov lítið afturhaldni og lótu almennu útreiðslurnar veksa í hákonjunkturinum fram til fíggjarkreppuna í 2008. Fíggjarpolitiska regluverkið hevur síðani verið orsøk til, at tað er tamarhald á almenna útreiðsluvøkstrinum í Danmark[26].

---

[24] Strukturellur javni er almenna úrslitið reinsað fyri óvanligar inntøkur og útreiðslur og konjunktursveiggj. Inntøkur og útreiðslur sum tilfeingisgjøld, blokkstuðul ella varandi skattalættar, ið eru afturvendandi, roknast uppí strukturella javnan, meðan serligar inntøkur, sum einstøk vinningsbýti ella útreiðslur sum t.d. hjálparpakkar í krepputíð, ikki væntast at vera afturvendandi, verða frároknaði í strukturella javnanum.
[25] De Økonomiske Råd, Dansk økonomi efterår 2023.
[26] De Økonomiske Råd, dors.dk.

# 6 Inflasjón og prísvøkstur

Inflasjón verður mátað sum samlaður prísvøkstur á vanligum vørum og tænastum í einum búskapi yvir eitt tíðarskeið. Inflasjón elvir til, at keypiorkan viknar, so brúkarin fær minni fyri peningin.

Tað eru nógvir faktorar, sum kunnu elva til inflasjón og vanliga tosa búskaparfrøðingar um tvær høvuðsorsøkir: eftirspurnardrivin inflasjón (demand-pull) og kostnaðardrivin inflasjón (cost-push). *Eftirspurnadrivin inflasjón* er tá ið eftirspurningurin eftir vørum og tænastum er størri, enn útboðið. Tá ið brúkarar og fyritøkur ynskja at brúka meira, og tað samstundis ikki eru nokk til av vørum og tænastum til at røkka eftirspurninginum, fara prísirnir upp. *Kostnaðardrivin inflasjón* er tá ið framleiðslan av vørum og tænastum dýrkar. Til dømis tá ið lønirnar ella rávøruprísirnir hækka. Hetta kann vera atvoldin til, at fyritøkur koyra príshækkingarnar víðari til brúkararnar at gjalda.

Brúkaraprístalið (CPI, consumer price index) og Framleiðsluprístalið (PPI) vera ofta nýtt til at fáa ábendingar um broytingar í yvirskipaðum prísløgum á vørum og tænastum. Hagstova Føroya ger upp brúkaraprístalið fýra ferðir árliga. Brúkaraprístalið verður uppgjørt við støði í prísum á umleið 6.500 vørum og tænastum, ið verða savnaði frá handlum, fyritøkum og stovnum úr øllum landinum. Prísurin á einkultu vørunum og tænastunum innganga í prístalinum við eini vekt, sum tekur støði í miðal nýtsluni hjá føroyingum. Um vit hugsa okkum til, at eitt vanligt húsarhald í Føroyum hevur eina samlaða nýtslu á 100 kr., so fara 20 kr. til matvørur og 18 kr. til býli, ið fyri ein stóran part er oljunýtsla til upphiting av sethúsum og rentuútreiðslur ella húsaleiga, og síðani viðlíkahald. Síðani fara 14 kr. til flutning, sum eru útreiðslur til keyp og rakstur av bili íroknað brennievni. Harafturat fara um 6 kr. til keyp av klæðum og skóm, og eini 8 kr. til møblar og húsarhaldsútgerð. Til frítíð og mentan, hotel og matstovur verða nýttar 14 kr., og restin av teimum 100 kr. verða nýttar til samskifti, heilsu og ymsar aðrar vørur og tænastur. Vektargrundarlagið er frá 2009, og átti at verið dagført, tí tað er so mikið gamalt. Nýtslumynstrið hjá brúkarunum er heilt víst broytt hesi 14 árini. Eitt nú hava nógv húsarhald lagt um til grøna orku, og tað verða seldir alsamt fleiri el-bilar.

Talva 6.1 niðanfyri vísur gongdina í prísunum í 12 høvuðsbólkunum, sum føroyska brúkaraprístalið er sett saman av. Seinasta brúkaraprístalið frá november 2023 vísur ein vøkstur á 2,8%, ið gevur ábending um at tíðarskeiðið við høgari inflasjón er yvirstaðið og meira støðugur prísvøkstur er í væntu. Hetta er í tráð við gongdina vit síggja í restina av Evropa.

**Brúkaraprístalið, skift á vøru- og tænastubólkar og tíðarskeið** — **Talva 6.1**

| Broyting síðan sama mánað árið fyri (prosent) | November '22 | Februar '23 | Mai '23 | August '23 | November '23 |
|---|---|---|---|---|---|
| Brúkaraprístalið | 10,1 | 8,3 | 4,4 | 3,7 | 2,8 |
| Matur og drykkjuvørur | 13,3 | 13,3 | 11,3 | 8 | 5,8 |
| Rúsdrekka og tubbak | 2,2 | 1,9 | 2,3 | 2,4 | 1,7 |
| Klædnavørur og fótbúnaður | 4,5 | 1,9 | 1 | 0,8 | -0,5 |
| Býli | 18,3 | 14,6 | 4,2 | 7,8 | 8,9 |
| Húsbúnaður og húshaldsútgerð | 12,6 | 9,3 | 9,4 | 2,7 | 0,1 |
| Heilsa | 1,2 | 1,2 | 2,1 | 0,1 | 1,5 |
| Flutningur | 10,7 | 6,1 | -5,2 | -4,7 | -6,4 |
| Samskifti | 13,9 | 12,3 | 4,8 | 4,9 | 4,2 |
| Frítíð og mentan | 5,7 | 4,6 | 7,3 | 4,9 | 4,5 |
| Útbúgving | 3,5 | 3,5 | 4,1 | 4,6 | 4,7 |
| Hotel og matveitarar | 2,3 | 2,2 | 1,4 | 1,1 | 1,2 |
| Ymiskar vørur og tænastur | 2,7 | 3,8 | 4,5 | 4,3 | 4 |

**Kelda:** Hagstova Føroya

Prísvøksturin er ymiskur í hvørjum høvuðsbólki. Tað er serliga prísurin á býli, ið er hækkaður nógv seinasta árið (8,9%) og orsøkin er hækkingin í rentuútreiðslunum. Matur og drykkjuvørur eru somuleiðis dýrkaðar nógv seinasta árið (5,8%). Føroyar innflyta meginpartin av hesum bólkinum, og tí ber til at siga, at inflasjónin er innflutt og er millum annað tengd at framleiðslukostnaðinum úti í heimi. Nærum

allar matvørur verða innfluttar úr Danmark og prísurin í Føroyum eigur tí at fylgja teimum donsku. Donsku matvøruprísirnirnir lækka í løtuni, og tí kann ein minni vøkstur væntast í hesum høvuðsbólkinum komandi tíðina. Flutningur hevur størstu afturgongd á 6,4%, ið millum stavar frá prísinum á brennievni, sum var høgur í byrjanini av 2023 og lækkaði nógv gjøgnum árið.

Tá ið prísgongdin í ymsu høvuðsbólkunum sveiggjar nógv og gongur í hvør sína ætt, er tað torført at siga, hvussu tað gongur í búskapinum, tí sveiggini grugga tølini. Verða tølini reinsaði fyri orku- og matvøruprísir fæst eitt mát, ið kallast kjarnuinflasjón. Kjarnuinflasjónin er eitt relativt nýtt hugtak og verður ikki uppgjørd av Hagstovu Føroya.

Í mynd 2.3, sæst, at aftaná nógv ár við støðugari lágari inflasjón, eru prísirnir øktir nógv síðani 2021. Prísirnir byrjaðu at veksa eftir Covid-19 tá ið fleiri lond stimbraðu eftirspurningin við hjálparpakkum. Í Covid-19 kom eisini eitt veitingartrot, sum trýsti prísirnar upp. Síðani var kríggið í Ukraina við til at trýsta prísirnar upp aftur meira upp. Í løtuni er tað í størri mun eftirspurningurin, sum togar inflasjónina upp orsakað av lagaligum fíggjarpolitikki.

Við høgari inflasjón fylgir stundum sveiggjandi inflasjón. Og tá ið framtíðarprísirnir gerast torførir at meta um, verður tað eisini verri fyri borgararnar og fyritøkurnar at taka búskaparligar avgerðir. Tað skaðar allan samfelagsbúskapin, og tí miða tey flestu londini eftir at hava eina støðuga lága inflasjón. Flestu miðbankar í heiminum miða tískil eftir lágum inflasjónsvøkstri fyri at tryggja búskaparligt støðufesti. Ein støðug inflasjón á 2% verður mett at stuðla javnari nýtslu og íløguhugi. Ov høg ella negativ inflasjón er hinvegin skaðilig fyri búskapin. Ov høg inflasjón útholar keypikraftina og negativ inflasjón elvir til, at fólk útseta sína nýtslu, tí tey vóna at tað verður bíligari í framtíðini. Hetta ger, at tað kemur stígur í búskapin.

Rentan er týdningarmiklasta amboðið hjá miðbankunum at ávirka inflasjónina við. Hækkar ein miðbanki rentuna, merkir tað, at tað verður dýrari at læna pening til nýtslu og íløgur. Tá tað verður dýrari at lána pening, lækkar samlaði eftirspurningurin í samfelagnum, ið tálmar inflasjónini. Somuleiðis ber til hjá miðbankunum at stimbra eftirspurningin í samfelagnum við at lækka rentuna. Pengapolitikkurin er danskt málsøki, og tí er tað danski tjóðbankin, sum setur rentustøðið hjá føroysku bankunum. Danski tjóðbankin fylgir rentugongdini hjá ECB, tí fremsta mál hjá danska tjóðbankanum er at tryggja fastan krónukurs mótvegis evruni.

Fíggjarpolitikkur kann eisini brúkast til at ávirka inflasjónina, tí almenna nýtslan og íløgurnar hava stóra ávirkan á eftirspurningin í samfelagsbúskapinum. Tó er hetta amboðið ikki líka vanligt at brúka til at basa inflasjónini við; almenna nýtslan og íløgurnar í Føroyum eru í øllum førum viðvirkandi til at varðveita ein ávísan prísvøkstur, tá ið lønarhækkingar ella skattalættar verða latnir. Lønarhækkingarnar og skattalættar elva til ein hægri eftirspurning, ið eggjar til størri nýtslu og virksemi í búskapinum; tað vil siga, at føroyski fíggjarpolitikkurin er konjunkturviðgangandi og ikki konjunkturmótgangandi, sum annars er uppgávan hjá eini politiskari skipan, ið førur ábyrgdarfullan fíggjarpolitikk.

# Fylgiskjal 1

**Lønargjaldingar býtt við løntakaratali, frároknað prísvøkstri**




**Viðm.:** Glíðandi miðal yvir fýra ársfjórðingar. Deflaterað er við brúkaraprístalinum.
**Kelda:** Hagstova Føroya, egnar útrokningar.

Enn hava vit ikki hagtøl fyri reallønarvøkstur, men lønargjaldingar býtt við løntakaratalinum frároknað prísvøkstur (brúkaraprístalið), kann leysliga umboða reallønarvøksturin. Myndin skal tó tulkast við fyrivarni, tí lønargjaldingarnar økjast, tá ið fólk arbeiða yvir, og tað merkir ikki, at reallønin er økt. Lønargjaldingarnar økjast eisini, tá ið fleiri løntakarar leggjast afturat løntakaratalinum, men eru tað nógv, sum bert arbeiða parttíð, togar tað lønargjaldingarnar fyri hvønn løntakara niður. Síðani nýggja fast track skipanin varð sett í verk, eru nógv útlendsk arbeiðsfólk vorðin ein partur av føroysku arbeiðsfjøldini. Um so er, at útlendsku arbeiðsfólkini í stóran mun starvast í láglønandi vinnum, verða samlaðu lønargjaldingarnar býtt á samlaða løntakaratalið, togað niður. Kortini eru lønargjaldingarnar fyri hvønn løntakara (frároknað prísvøkstur) ein góð ábending um reallønarvøksturin í Føroyum, tí nominellu lønarhækkingarnar hava í mong ár á rað verið størri, enn prísvøksturin, og løntakarin í Føroyum hevur tískil havt reallønarvøkstur í nógv ár fram til 2021, tá ið inflasjónin byrjaði at veksa.

# Fylgiskjal 2

Talvurnar niðanfyri vísa inntøkurnar frá loyvisgjøldnum frá alivinnuni og avgjøldum á fiskatilfeingi í árunum 2018 til 2024 (2023 og 2024 eru fíggjarlógartølini). Harafturat vísir talva F2.2 javningina av inntøkunum frá fiski- og alivinnuni. Talva F2.3 vísir, hvussu nógv av inntøkunum skal í búskapargrunn og hvussu nógv fer aftur á fíggjarlógina.

**Talva F2.1**

| | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | Fíggjarlógin 2023 | Fíggjarlógin 2024 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Loyvisgjøld á alivinnu | 136.361 | 139.996 | 81.813 | 196.157 | 284.214 | 270.000 | 354.760 |
| Avgjald á fiskatilfeingið | 303.290 | 369.594 | 293.761 | 314.067 | 380.196 | 400.000 | 530.900 |
| **Til búskapargrunn frá tilfeingisvinnunum** | **439.651** | **509.590** | **375.574** | **510.224** | **664.410** | **670.000** | **885.660** |
| | | | | | | | |
| Alivinnan - aftur á fíggjarlógina | 150.000 | 150.000 | 150.000 | 150.000 | 150.000 | 150.000 | 150.000 |
| Fiskivinnan - aftur á fíggjarlógina | 250.000 | 250.000 | 250.000 | 250.000 | 250.000 | 250.000 | 250.000 |
| | | | | | | | |
| At javna alivinnan | - | - | - | 46.157 | 134.214 | 120.000 | 204.760 |
| At javna fiskivinnan | 53.290 | 119.594 | 43.761 | 64.067 | 130.196 | 150.000 | 280.900 |

**Kelda:** Búskaparskipan landsins og Búskaparráðið

**Talva F2.2**

| | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Alivnnan javning á fíggjarlógina (2021) | | | | 6.594 | 6.594 | 6.594 | 6.594 |
| Alivnnan javning á fíggjarlógina (2022) | | | | | 19.173 | 19.173 | 19.173 |
| Alivnnan javning á fíggjarlógina (2023) | | | | | | 17.143 | 17.143 |
| Alivnnan javning á fíggjarlógina (2024) | | | | | | | 29.251 |
| Fiskivinnan javning á fíggjarlógina (2018) | 7.613 | 7.613 | 7.613 | 7.613 | 7.613 | 7.613 | 7.613 |
| Fiskivinnan javning á fíggjarlógina (2019) | | 17.085 | 17.085 | 17.085 | 17.085 | 17.085 | 17.085 |
| Fiskivinnan javning á fíggjarlógina (2020) | | | 6.252 | 6.252 | 6.252 | 6.252 | 6.252 |
| Fiskivinnan javning á fíggjarlógina (2021) | | | | 9.152 | 9.152 | 9.152 | 9.152 |
| Fiskivinnan javning á fíggjarlógina (2022) | | | | | 18.599 | 18.599 | 18.599 |
| Fiskivinnan javning á fíggjarlógina (2023) | | | | | | 21.429 | 21.429 |
| Fiskivinnan javning á fíggjarlógina (2024) | | | | | | | 40.129 |
| **Tilsamans á fíggjarlógina umvegis javning** | **7.613** | **24.698** | **30.949** | **46.696** | **84.468** | **123.040** | **192.420** |

**Kelda:** Búskaparskipan landsins og Búskaparráðið

**Talva F2.3**

| | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Aftur á fíggjarlógina tilsamans | **393.974** | **414.694** | **362.762** | **446.696** | **484.468** | **523.040** | **592.420** |
| | | | | | | | |
| Upphædd í búskapargrunn | 439.651 | 509.590 | 375.574 | 510.224 | 664.410 | 670.000 | 885.660 |
| Upphædd aftur á fíggjarlógina | 393.974 | 414.694 | 362.762 | 446.696 | 484.468 | 523.040 | 592.420 |
| **Munur** | **45.677** | **94.896** | **12.812** | **63.528** | **179.942** | **146.960** | **293.240** |

**Kelda:** Búskaparskipan landsins og Búskaparráðið

# Keldur

Avrik sp/f, Hvalvík

BankNordik

Betri Banki

Betri Heim

Danmarks Nationalbank (gjaldoyrakursir)

De Økonomiske Råd

ECB

Felagið Nótaskip

Fishpool.eu

Fíggjarmálaráðið (fíggjarlóg)

Føroya Gjaldstova, Búskaparskipan Landsins (BSL) og landsroknskapurin

Hagstova Føroya, hagtøl og tíðindaskriv

Havstovan og ICES

IMF (altjóða útlit)

Landsbanki Føroya, MFI hagtøl, útrokningar og metingar

Lív, ársroknskapur 2022

Samrøður við fólk innan byggivinnuna

Samrøður við fólk innan botnfisk, fiskavirkir, uppsjóvarvinnu og Barentshavið

Samrøður við fyritøkur í alivinnuni

Vinnuhúsið

Vørn

# Tables and figures


| | |
|---|---|
| Talva 1.1 / Table 1.1 | GDP percentage year-on-year growth in current prices, 2021 to 2025. |
| Mynd 1.1 / Figure 1.1 | GDP growth in current prices and fixed 2010-prices, 2008 to 2025. |
| Mynd 1.2 / Figure 1.2 | GDP growth in current prices and growth contribution, 1999 to 2025. |
| Mynd 1.3 / Figure 1.3 | Real % growth in GDP, fixed prices, 2009-2022. |
| Mynd 1.4 / Figure 1.4 | Real GDP growth and growth contribution from industrial sectors, 2009 to 2022. |
| Talva 1.2 / Table 1.2 | Gross value added, 2009-2022. |
| Talva 1.3 / Table 1.3 | Average real GDP growth 2009-2022 in the Nordic countries. |
| Mynd 1.5 / Figure 1.5 | Real GDP growth %, Faroe Islands, Denmark, UK, EU and USA. |
| Mynd 2.1 / Figure 2.1 | Business trends survey for households: Total Confidence indicator for Faroese households, jan-06 to jan-24. |
| Mynd 2.2 / Figure 2.2 | Number of wage earners and number of unemployed, jan-08 to jan-24. |
| Mynd 2.3 / Figure 2.3 | Inflation, consumer price index %-changes, may-12 to nov-23. |
| Mynd 2.4 / Figure 2.4 | Consumer price index, selected categories, percentage change (yearly), may-12 to nov-23. |
| Mynd 2.5 / Figure 2.5 | Payment card transactions in mill. DKK in current prices, domestic and abroad, jan-21 to des-23. |
| Mynd 2.6 / Figure 2.6 | Wage income and government revenue from VAT, January 1998 to Dec. 2023, shown as index (Jan 1998=100). |
| Mynd 2.7 / Figure 2.7 | Wages and imported commodities by households. |
| Mynd 2.8a / Figure 2.8a | Retail trade index, trend in current prices, 1. Quarter 2001 to 1. Quarter 2023. |
| Mynd 2.8b / Figure 2.8b | Retail trade index, trend in fixed prices, 1. Quarter 2001 to 1. Quarter 2023. |
| Mynd 2.9 / Figure 2.9 | Sales of passenger cars for private consumption, 2020-2023 |
| Mynd 2.10 / Figure 2.10 | Average market prices in real estate in thousand DKK, Tórshavn (houses and apartments), other cities and larger villages (houses) and smaller villages (houses), 1985 to 2023. |
| Mynd 2.11 / Figure 2.11 | Real estate prices and disposable income (index 1998=1), Growth in real house prices (Growth in real house prices right axis), 1998 to 2023. |
| Mynd 2.12 / Figure 2.12 | Business trends surveys: Total confidence indicator, for consumers and industry, jan-07 to jan-24. |
| Mynd 2.13 / Figure 2.13 | Foreign workers in percentage of combined workforce, selected branches of industry, jan-00 to jan-24. |

| | |
|---|---|
| Mynd 3.1 / Figure 3.1 | Central government financial results (central government budget balance) in DKK millions, 1998 to 2025. RLÚ 1: ordinary, and RLÚ 1 as a percentage of GDP. |
| Mynd 3.2 / Figure 3.2 | Government (i.e., public) consumption in DKK millions and yearly growth in government consumption in percent (right axis), 2000 to 2025. |
| Mynd 3.3 / Figure 3.3 | Government investments in DKK millions, 2003 to 2025. |
| Mynd 4.1 / Figure 4.1 | Balance of foreign trade (goods only) calculated as 12-month rolling total, jan-94 to des-23, in DKK millions (ships excluded, ships included). |
| Mynd 4.2 / Figure 4.2 | Import and export of products (excluding ships and airplanes), jan-94 to des-23. |
| Mynd 4.3 / Figure 4.3 | Export of three types of fish products, calculated as 12-month rolling total, jan-94 to des-23, in DKK millions (salmon, pelagic fish, demersal fish and other fish). |
| Mynd 4.4 / Figure 4.4 | Catches in tons from sea farming, 1998 to 2024. |
| Mynd 4.5 / Figure 4.5 | Weekly spot prices for salmon in Danish kroner (DKK), jan-04 to feb-24. |
| Mynd 4.6 / Figure 4.6 | Unit prices in the exports of mackerel and herring, based on 12 months rolling total, jan-95 to des-23. |
| Mynd 4.7 / Figure 4.7 | Cod in Faroese waters: estimated stock and catches (in tons) and fishing intensity 1959 to 2026. |
| Mynd 4.8 / Figure 4.8 | Unit prices in the exports of demersal fish (cod, haddock, and saithe), based on 12 months rolling total, jan-95 to des-23. |
| Mynd 5.1 / Figure 5.1 | Capital expenditures (% of GDP) 1998-2022. |
| Mynd 5.2 / Figure 5.2 | Operating expenditures (% of GDP and amount), 1998-2022. |
| Mynd 5.3 / Figure 5.3 | Net immigration, 1985 to des-23. |
| Mynd 5.4 / Figure 5.4 | Growth of elderly people above the year of 80, period of 5 years, 2000 to 2060. |
| Mynd 5.5a / Figure 5.5a | Revenue and expenditures in the public sector, Pensjónsaldurin hækkar við einum hálvum ári í 2025 og 2030. Inntøkur og útreiðslur almenna geirans. |
| Mynd 5.5b / Figure 5.5b | Pensjónsaldurin hækkar við einum hálvum ári í 2025 og 2030. Úrslit á primeru saldo. |
| Mynd 5.6a / Figure 5.6a | Pensjónsaldurin hækkar við einum ári fimta hvørt ár (frá 2035). Inntøkur og útreiðslur almenna geirans. |
| Mynd 5.6b / Figure 5.6b | Pensjónsaldurin hækkar við einum ári fimta hvørt ár (frá 2035). Úrslit á primeru saldo. |
| Mynd 5.7 / Figure 5.7 | Net immigration grouped by Danish citizen or other citizens, 2000 to 2003. |

## Tíðindaskriv frá Búskaparráðnum 29. februar 2024

# Búskapurin er stinnur, men landskassin bløðir

*Lyklatølini vísa framvegis, at føroyski búskapurin er stinnur. Framleiðslan (BTÚ í leypandi prísum) er mett at veksa 4,4% í 2024 og arbeiðsloysið er framvegis søguliga lágt. Lønarútgjaldingarnar og løntakaratalið settu met í 2023, og handilsjavnin hevur framhaldandi stórt yvirskot. Hóast búskaparliga framgongd er hallið hjá landskassanum stórt.*

Vøksturin í BTÚ í leypandi prísum er mettur til 5,4% í 2023, 4,4% í 2024 og 2,8% í 2025. Tað er framvegis avlop á handilsjavnanum. Arbeiðsmarknaðurin er sterkur og tað ger, at húsarhaldini hava varðveitt bjartskygnið, hóast rentuhækkingar og inflasjón hava minkað um keypiorkuna síðani á sumri í 2022. Prísirnir veksa enn, men ikki eins nógv, sum teir hava tað seinasta árið. Treystið hjá vinnuni var lægri í januar 2024 enn í juni 2023. Tað eru serliga tilfeingisvinnan, handilsvinna og tænsastuvinnan, sum lata verri at, meðan treystið í byggivinnuni hinvegin framvegis er gott.

**Megna ikki at halda aftur við útreiðsluvøkstri**
Mest sannlíkt hevur landskassin hall í 2023, 2024 og 2025. Úrslitini staðfesta, at politiska skipanin framvegis ikki megnar at halda aftur við útreiðsluvøkstri í góðum tíðum. Búskaparráðið metir tað vera illa frágingið, tá ið úrslitið á fíggjarlógini vísir eitt hall í bæði 2024 og 2025 eftir áhaldandi búskaparvøkstri í fleiri ár á rað við lágum arbeiðsloysi og stórum inntøkuvøkstri í landskassanum. Úrslitið á fíggjarlógini (RLÚ 1) metir Búskaparráðið verður -146 mió. kr. í 2024 og -31 mió. kr. í 2025. Veruliga úrslitið er tó verri enn tað, tí ein partur av tilfeingisinntøkunum skal sambært lóg í búskapargrunnin. Í 2024 er metta úrslitið tí ikki -146 mió. kr. men -439 mió. kr. Henda uppstilling av fíggjarlógini, har tað ikki verður tikið hædd fyri, at inntøkur av tilfeingisgjøldum skulu í búskapargrunnin, ger tað sera ringt hjá politikarunum og borgarum at gjøgnumskoða, hvat veruliga úrslitið á fíggjarlógini er, og hvørjum úrsliti politiska skipanin kann raðfesta eftir.

**Haldførisavbjóðingin má handfarast**
Ávísin fyri fíggjarpolitiska haldførið er -9% av BTÚ, vísir nýggja greiningin av haldførinum hjá Búskaparráðnum. Av tí, at tað í framtíðini ikki verður sama lutfall millum tal av forsyrgjarum og tey, ið skulu forsyrgjast, sum í dag, verður fíggingartørvurin 45 mia. kr. tey komandi 40 árini. Í núverandi lóggávu er samtykt at hækka pensjónsaldurin við einum hálvum ári í 2025 og 2030, men tað røkkur ikki til at loysa haldførisavbjóðingina. Hækkar pensjónsaldurin ístaðin við einum ári fimta hvørt ár frá 2035, gerst fíggjarpolitikkurin haldførur og fíggingartørvurin minkar niður í 12 mia. kr. komandi 40 árini. Politiska skipanin noyðist tí at fremja nýskipanir og átøk, sum minka um útreiðslurnar og økja inntøkurnar, umframt at hækka pensjónsaldurin við einum ári fimta hvørt ár. Eitt tiltak at tálma útreiðslunum er at seta í verk eitt fíggjarpolitiskt regluverk. Politiska skipanin eigur í eini breiðari semju, at seta sær mál fyri úrslitið hjá almenna geiranum 10 ár fram í tíð, sum er í samsvar við ein haldføran búskap í langa høpinum, tað vil siga hjá landi og kommunum undir einum.

**Veks um arbeiðsútboðið**
At stytta arbeiðsvikuna minkar um arbeiðsútboðið, men verður hetta kortini framt, eigur politiska skipanin at fremja átøk, ið økja um arbeiðsútboðið. Trot á arbeiðsmegi er og verður frameftir ein stór avbjóðing fyri føroyska búskapin, bæði í almenna og privata geiranum. Fast-track skipanin hevur lætt um trýstið á arbeiðsmarknaðinum. Eisini er tað er eitt stig á røttu leiðini, at politiska skipanin hevur minkað um frádráttirnar til fólk, sum arbeiða uttanlands. Búskaparráðið er tó av tí fatan, at allar serskattaskipanir, sum eggja fólki at arbeiða uttanlands heldur enn í Føroyum, eiga at vera avtiknar.

**Avtak stuðulsskipanir**
Tað darvar búskaparligu menningina í Føroyum, at skipanir stuðla framhaldandi rakstri í vinnum, sum geva ivasamt ískoyti til búskapin. Fiskavirkisskipanin fastheldur fólki í vinnum við lítlum ella ongum avkasti, ið ikki kann bjóða arbeiði alt árið, og sum forðar starvsfólkunum í at fáa sær arbeiði í øðrum vinnum, har tey

kundu givið størri íkast til búskapin. Minstalønin til fiskimenn og ásetingin um brúksskyldu ger, at hóast fiskiskapurin ikki ber seg, verður kortini fiskað. Møguleikin at fáa útlendska manning til fiskiskip, sum fiska so mikið lítið, at manningin er á minstuløn meginpartin av árinum, ger harumframt, at vit fáa arbeiðsmegi til fyritøkur, sum ikki klára at geva kappingarførar hýrur til føroyska manning. Tað heldur lív í einum yvirkapasiteti tá ið fyritøkur, sum annars høvdu lagt skipini tí tey ikki klára at manna tey, fáa mannað tey við útlendingum.

# English summary

**The Economic Situation Remains Unchanged**

The Faroe Islands Economic Council has revised the 2023 - 2024 GDP growth rates taking into account updated statistics and produced a forecast for 2025. Statistics Faroe Islands has also issued definitive GDP growth figures in current and fixed prices for the years 1998 to 2022. Real GDP growth amounted to 5.8% in 2021 and 5.4% in 2022 driven by the Faroese economy bouncing back after the Covid pandemic; the contribution to growth comes especially from the primary sector and the private sector service industry. GDP Growth rate estimates for 2023-2025 are calculated in current prices as: 5.4% in 2023, 4.4% in 2024 and 2.8% in 2025.

| | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 | 2025 |
|---|---|---|---|---|---|
| GDP growth in current prices | 7.7% | 9.5% | 5.4% | 4.4% | 2.8% |
| GDP growth in fixed prices | 5.8% | 5.4% | | | |

**Note:** 2021 and 2022 figures were calculated by Statistics Faroe Islands. 2023, 2024 and 2025 are estimates issued by the Faroe Islands Economic Council.
**Source:** Statistics Faroe Islands and Faroe Islands Economic Council

Key figures continue to demonstrate that the **Faroese economy is robust**. While export of certain stocks (salmon and demersal fish) was lower in 2023, an increase in the blue whiting quota raised export volumes of processed fish products, among other goods. While export value grew in 2023, import value fell due to lower oil prices, amongst other things, and therefore there was a **trade balance surplus again** in 2023.

Unemployment remains low in the Faroe Islands (1% in Jan. 2024). **The strong labour market** induces the **households to remain optimistic**, in spite of the fact that interest rate have increased and higher inflation has weakened the purchasing power since the summer of 2022. Prospects of wage increases and tax cuts along with lower inflation and the expectation that the interest rate will fall are likely contributing to households remaining confident.

**Prices are still rising**, but **not as much** as they have been in the last year. In the fourth quarter of 2023 the consumer price index rose by 2.8%, which is significantly less than the growth in the consumer price index since mid 2022. While oil prices had the greatest impact on the consumer price index in early 2022, it has since been food prices that have increased the consumer price index. By close of 2023, however, interest rate expenses had the greatest impact on the consumer price index. **There have been 10 interest rate hikes** since the summer of 2022, and mortgage interest expenses have risen by 82% for Faroese households in the period July 2022 - December 2023.

The financial institutions estimate that **households** have become **slightly more cautious** since interest rates and price levels began to rise. However, it is likely that they had the financial margin to absorb the higher cost of living. First time buyers have, however, found it even more difficult to get a foothold on the housing market in the capital in 2023 than in previous years. In Tórshavn housing prices remained constant in 2023 as compared to 2022, while the larger villages and Suðuroy and Sandoy experienced a drop in prices. In the smaller villages the average price of a house was higher in 2023 compared to 2022.

**The confidence index for the business sector** was **lower** in January 2024 than in June 2023. The primary sector is reporting lower demand and larger stocks of finished goods, but the industry expects prices to rise for herring and Barents Sea cod due to reduced quotas. In addition, the sector anticipates a stagnation to the international supply of salmon, which could result in higher prices of salmon in 2024. The retail industry is not optimistic and is reporting large volumes of stock in storage and lower sales

forecasts for 2024. Households have shifted to cheaper goods and the demand for new cars has fallen drastically. The private services industry estimated that the 2023 turnover was unsatisfactory but remains optimistic about demand in 2024. On the other hand, confidence in the construction industry remains high and one of every two construction companies is reporting a shortage of labour, while the tourism sector is reporting increased international bookings for the summer and autumn of 2024.

The **result on the central government budget** is forecasted by the Faroe Islands Economic Council to a deficit of **DKK 146 million in 2024** and a deficit of **DKK 31 million in 2025**. The estimate is based on the 2024 fiscal budget, which shows a surplus of approximately DKK 4 million. Public investments worth DKK 200 million have been carried over from 2023 and The Economic Council estimates that DKK 100 million of these carry-overs will be used in 2024, also the VAT income will be DKK 50 million less than estimated. For the fiscal year 2025 the Economic Council has based its estimate on projections made by the Ministry for Finance. These projections do not, however, take into account price and wage growth, and the Economic Council has therefore added these. This yields a deficit of DKK 31 million in 2025. The deficit is lower in 2025 than 2024 due to a drop in government investments by nearly DKK 200 million. The Faroe Islands Economic Council considers it to be poor financial management when the central government budget yields a deficit in both 2024 and 2025 following several consecutive years of economic growth with low unemployment and considerable rises in treasury revenue. These results demonstrate that **the political system** remains **unable to hold back in expenditures during upswings**. In addition, resource rent revenues allocated for transfer to Búskapargrunnur Føroya (Faroe Islands sovereign wealth consolidation fund) are classed as revenues on the national budget. This makes it very difficult for politicians and the public to interpret what the actual budget results are and thus it is hard to see how the political system should prioritize.

**Call for a fiscal framework**

The **fiscal policy sustainability indicator is -9% of GDP** according to a recent sustainability analysis carried out by the Faroe Islands Economic Council. Given that in the future the ratio between providers and those who need providing will not be the same as today the financial requirement over the coming 40 years will amount to DKK 45 billion.

Current legislation stipulates increasing the retirement age by six months in 2025 and in 2030, however, this will not suffice to meet the sustainability challenge. If, however, **the retirement age** were to **rise by one year** every five years from 2035, then the fiscal policy will, in time, become sustainable and the financial requirement will drop to DKK 12 billion over the next 40 years. The political system will therefore have to implement reforms and measures to reduce expenditure and raise revenue, as well as increase the retirement age by one year every five years.

A fiscal framework would enable **reigning in spending growth**. The political system should in a **broad consensus**, draw up **public sector budget targets for a 10-year period**, which are in line with a sustainable economy in the long term. This includes both state and municipalities budgets. Once this is done, revenues for this period will be forecasted and subsequently the expenditure these revenues suffice to cover are calculated, on the condition that the budget target is reached. Central government should in this context negotiate with local government (municipalities) on a spending framework for, e.g., a four-year period, which is fixed but where the municipalities are free to set their own priorities.

**Increase labour supply**

Shortening the working week reduces labour supply, but if this measure is implemented, the political system should carry out **measures to increase the supply of labour.** Labour shortages are and will remain a major challenge for the Faroese economy, both in the public and private sector. The fast-track system has alleviated pressure in certain areas of the labour market. It is also a step in the right direction that the political system has lowered tax rebates for people working abroad. The Economic

Council is, however, convinced that **all special tax regimes, which encourage people to work abroad** rather than in the Faroe Islands **should be repealed**.

**Withdraw public subsidies schemes**

It hampers economic development in the Faroe Islands that **public subsidies schemes continue to support operations in loss-making industries**. The Faroe Islands have several forms of such subsidies schemes. One is the unemployment service for the workers in the fish processing industry, which retains people in industries with little to no profit and cannot offer employment year-round, and which prevents people from seeking employment in other industries where they could contribute more to the economy. Another scheme which is private is a scheme that ensures workers on fishing vessels a minimum wage. This minimum wage combined with the stipulation of an obligation to use a quota means that, even when certain fisheries are not economically viable, they continue to operate. As stocks shrink, this scheme drives fisheries to continue leading to further stock depletion. The possibility of bringing in foreign crews for fisheries that fish so little that the crew receive minimum wages most of the year, also means that the Faroe Islands receives foreign workers for businesses, which cannot pay competitive wages to Faroese crews. This system leads businesses, which otherwise probably would have kept their vessel from fishing, to man them with foreign workers and thereby these schemes result in maintaining an overcapacity in the Faroese fishing fleet.